# Føroya landsbókasavn



Fetgar í fert

~~TINDHÓLMUR~~

Tindhólmur er ikki sum oyggjar flest, hann kennist meira einsærur. Tað berst tær fyri, at hann er sitthvørt livandi, fólk ella fæ, sum er gandað og vorðið til stein.

Móti suðri er tað líkt til, at hann er ein tarvur, sum við lútandi hornum stendur og bylgist móti útsynningi; men tarvurin hevur verið av hulduslag, og í gomlum døgum hevur útsunningurin tikið halgar munkar við sær úr Suðuroyum, teir hava rist kross fyri bøllan á tarvinum og hann er vorðin til stein.

Úr Mykinesi er Tindhólmur meira bliðskortaður at siggja, eitt vælvallað fjall, sum ger seg tekkiligt fyri vestanvindinum, hvør skal siga "kom svøima, mjúki ~~vestanvindur~~ . . ."

Frá Dragasundi er hann eitt skip, sum kemur siglandi, hýrðir ein hvassan skut inn móti Lítladrangi, í erva standa siglitrøðini og vaða í skýggjunum og aftan á skipið brýtur kjalarvørrin, skergarðurin út eftir og Eiríksboði.

Men norðanífrá er Tindhólmur ein móðir, sum hábers-

konufólk ~~menniska~~ á einum heygg
n óvanda dag. Tað
svdu stið so, at teir
visti hon eingi ráð
uttan at geva teimum

Heðin Brú.

# Ársfrágreiðing 2001

# Føroya landsbókasavn

# Ársfrágreiðing
# 2001

Tórshavn
2002

| | |
|---|---|
| Forsíðumynd: | Handritsbrot úr skaldsøguni *Feðgum á ferð (E601)* eftir Heðin Brú |
| Mynd á síðu 17: | Sverri Egholm. Foto: Jens Kristian Vang |
| Mynd á síðu 18: | Føroya landsbókasavn. Teknað: J. P. Gregoriussen |
| Prent og innbinding: | Føroya landsbókasavn |
| Lagt til rættis: | Rannvá Hanusardóttir, Martin Næs og<br>Hans Jákup av Skarði |

ISBN 99918-61-06-8

# INNIHALDSYVIRLIT

Tøknin, tíðin og tænastan ........ 5

BÓKASØVN
Føroya landsbókasavn ........ 7
Fólkabókasøvn ........ 10
Býarbókasavnið ........ 11
Skúlabókasøvn ........ 11
Bókasavnsgjaldið ........ 11
Mikrofilmar ........ 12

Bókmentavirðislønir ........ 13

BÓKAÚTGÁVA ........ 13
Týðingar ........ 14
Prentingin ........ 14
Útgevarar ........ 14
Nær í árinum komu bøkurnar út? ........ 15
Bløð og tíðarrit ........ 15
Avísir ........ 15
Ljóðbøkur ........ 15

Minningarorð um Sverra Egholm ........ 17
Tórbjørn Jacobsen: Saltið í rúkandi døgurðapottum! ........ 19
Erhard Jacobsen: At hava grein í sínum máli ........ 26
Durita Joensen: Norðurlendska bókasavnsvikan ........ 37
Herluf Hansen: Setursbókasavnið ........ 39
Erhard Jacobsen: Hava talmerkt bøkur í góð 5 ár (ISBN) ........ 40
Tórbjørn Jacobsen: Uppskot um løgtingslóg um bókasøvn ........ 42

BÓKASØVN ........ 45

TALVUR ........ 49

# Tøknin, tíðin og tænastan

Árið 2001 var hendingaríkt á mangan hátt.

Tað byrjaði longu ein av teimum fyrstu døgunum í januar, tá ið Landsbókasavnið fekk avhent eitt stórt og ómetaliga forvitnisligt og dýrabart handritasavn eftir Heðin Brú, rithøvund.

Seinni í januar varð skipað fyri upplestri úr nýggjum føroyskum yrkingasøvnum. Til hetta tiltakið høvdu vit, umframt sjálvan upplesturin, eisini fingið bæði Tórbjørn Jacobsen, mentamálaráðharra, og Maluna Marnersdóttur, rektara og bókmentafrøðing, at geva síni íkøst. Tórbjørn Jacobsen helt eina røðu til heiðurs fyri yrkingini, og Malan Marnersdóttir gjørdi eina meting av støðinum í føroyskum skaldskapi ár 2000. Beinleiðis orsøkin til hetta tiltakið var tann framsýningin, sum um hetta mundið stóð á savninum og sum bar heitið 'Úr sjón og úr minni – Chr. Matras 100 ár', har dentur eisini varð lagdur á, hvønn týdning Chr. Matras og hansara yrkingar hava enn dagin í dag.

Seinastu tvey árini hevur verið arbeitt við at endurskoða bókasavnslógina. Uppskot til nýggja bókasavnslóg varð lagt fyri Løgtingið í mars, og í mai varð hon samtykt at koma í gildi 1. januar 2002.

At bókasavnslógin er endurskoðað, má takast sum eitt tekin um, at tann politiski myndugleikin heldur tað vera neyðugt hjá samfelagnum at veita eina tænastu sum bókasavnstænastuna.

Á ólavsøku lat stór handrita- og bókaframsýning upp í sambandi við at 100 ár vóru liðin, síðan Heðin Brú, rithøvundur, var borin í heim. 'Skaldið úr Skálavík' var heitið á framsýningini, sum partvís eisini varð sett upp í Skálavík í november.

Av øðrum hendingum í árinum kunnu nevnast, at tveir bókavørðir eru settir í fyribilsstørv at skráseta bókasøvnini á vinnu- og miðnámsskúlunum í landinum, og ein bókabindaralærlingur er komin í læru á verkstaðnum. Við hesum kann sigast, at vit, so smátt, eru farin undir at fyrireika okkum at seta ta nýggju lógina í verk.

Sum alt annað í samfelagnum eru bókasøvnini eisini inni í eini áhaldandi broytingartíð, har vit renna um kapp við tøknina og tíðina og tænastuna.

– Tøknini og tíðini mugu vit bara fylgja, men tænastuni mugu vit sjálv taka okkum av – og her liggur avbjóðingin í framtíðini.

Martin Næs

# Bókasøvn

## Føroya landsbókasavn

Við heimastýrislógini varð bókasavnsmálið yvirtikið sum føroyskt sermál og Føroya landsbókasavn, stovnað 1828 sum sjálveigandi stovnur, kom undir landsstýrið og fekk sambært lóg frá 1952 álagt sum landsbókasavn at savna allar føroyskar bókmentir og so mikið sum gjørligt av bókmentum um Føroyar. Haraftrat skal Landsbókasavnið sum megin- og vísindabókasavn "virka fyri útbreiðslu av kunnleika og upplýsing í landinum". Tað hevur eftirlit við fólkabókasøvnunum, býtir løgtingsstudningin og stendur eisini fyri bókakeypi og skráseting hjá teimum bókasøvnum, ið ikki sjálv hava útbúgvið fólk til hetta.

Prentsmiðjurnar hava lógfesta skyldu at lata Landsbókasavninum 4 eintøk av hvørjum prentluti til avgreiðslu. Harumframt hevur savnið rætt til eyka fríeintøk frá forløgunum at nýta í sambandi við bókabýti við útlendsk bókasøvn.

Í sambandi við føroyadeild savnsins verður árliga føroyskur bókalisti gjørdur - ein skráseting av øllum tilfari, sum Landsbókasavnið hevur útvegað sær viðvíkjandi Føroyum. Tilfarið í føroyadeildini er støðugt vaksandi. Hetta tilfarið verður bert lænt til nýtslu á lesistovuni, og hevði Landsbókasavnið í 2001 1.339 (1.259)[1] lán úr føroya- og handritadeildini.

Savnsins fíggjarætlan fyri 2001 var kr. 5.254.000 (4.984.000). Av hesum vóru kr. 566.000 (628.000) brúktar til keyp og innbinding av bókum, til blað- og tíðarritahald o.a.t.

Bókatalið á Landsbókasavninum var við árslok 2001 um 144.000 (141.000); av hesum eru um 20.000 á vísindadeildini. Bókasavnið hevur harumframt tíðarrit og 563 (550) mikrofilmar av føroyskum avísum.

Í føroyadeildini vóru við árslok 2001 um 13.659 (13.528) bøkur, 1.683 (1.620) handritapakkar, 1.540 (1.540) føroyskar plátur, ljómfløgur, kassettu- og sjónbond umframt smáprent og annað tilfar.

Fyrilestrarsalurin á Landsbókasavninum verður læntur stovnum, feløgum og einstaklingum til fundir, skeið, framsýningar og undirvísing. Í 2001 var fyrilestrarsalurin útlæntur í 100 (98) dagar.

### Útlán

Landsbókasavnið lænti 18.000 (17.500) bøkur út í 2001. Av hesum vóru 1.609 bøkur/greinar læntar/útvegaðar frá bókasøvnum uttanlands og 11 bøkur frá øðrum søvnum í Føroyum. Við árslok vóru 5.350 (4.900) fólk skrásett sum lánarar.

Upplatingartíðirnar vóru: mánadag-mikudag kl. 10-20 og hósdag-fríggjadag kl. 10-17, tilsamans 44 tímar um vikuna. Í tíðarskeiðnum 18. juni til 17. august vóru upplatingartíðirnar tó mánadag-fríggjadag kl. 13-17.

### Vitjandi

Í 2001 vóru 27.000 vitjandi á savninum, og heimasíðan www.flb.fo varð vitjað 19.782 ferðir.

---

[1] *tølini í ( ) eru samsvarandi tøl fyri 2000*

**Starvsfólk**

| | | |
|---|---|---|
| Martin Næs | landsbókavørður | |
| Durita Joensen | 1. bókavørður | |
| Vígdis Bjarnadóttir | bókavørður | (1. juli-) |
| Mortan Hentze Christensen | - | |
| Arnbjørn Dalsgarð | - | |
| Halldóra Dam | - | (-31. aug.) |
| Herluf Hansen | - | |
| Bergljót Debes Hentze | - | (1. nov.-) |
| Erhard Jacobsen | - | (1. sept.-) |
| Marjun Patursson | - | |
| Annika Smith | - | (-31. aug.) |
| Vónbjørt Vang Solmunde | - | (15. aug.-) |
| Laura Vinther | - | |
| Marjun Berg | bókasavnshjálpari | |
| Jórun Dal-Christiansen | - | |
| Maja Dalsgaard | - | (-30. juni) |
| Ingrið Hammer | - | |
| Tórunn Jacobsen | - | |
| Alis Joensen | - | (1. juli-) |
| René A. Long | - | |
| Inga Sørensen | skrivari | |
| Maud F. Poulsen | skrivstovufólk | (1. nov.-) |
| Rannvá Hanusardóttir | - | |
| Hans Jákup av Skarði | bókabindari | |
| Sóleyg Kjærbæk | bókabindaralærlingur | (1. sept.-) |
| Birni Durhuus | telduvørður | |
| Asbjørn Johannesen | húsavørður | |

**Avloysarar**

| | | |
|---|---|---|
| Eyðna Hammer | bókasavnshjálpari | (5. mars-17. aug.) |

**Farloyvi**

| | | |
|---|---|---|
| Óluva Isaksen | 1. bókavørður | (-31. aug.) |
| Erhard Jacobsen | bókavørður | (-31. aug.) |
| Halldóra Dam | - | (1. sept.-) |

**Næmingar í starvslæru**

| | | |
|---|---|---|
| Símun Chr. Olsen | Tofta skúli | (1.-4. mai) |
| Svenn Óli Vilhelmsen | | (1. mai-30. juni) |
| Martin O. Hansen | | (10. des.-) |

**Framsýningar o.a.**

21. januar

**Upplestur av nýggjum føroyskum yrkingum** eftir Regin Dahl, Tórodd Poulsen, Oddfríð M. Rasmussen, Valdemar á Løgmansbø, Johan Mortensen og David Johannesen. Tórbjørn Jacobsen, mentamálaráðharri, helt røðu, og Malan Marnersdóttir, rektari, tosaði um føroyskan skaldskap anno 2000.

| | |
|---|---|
| 21.-23. apríl | **Fundur í Havn í Útnorður-verkætlanarbólkinum** um talgilding av tíðarritum í Íslandi, Grønlandi og í Føroyum. Luttakarar: Örn Hrafnkelsson og Haukur Bragason, Landsbókasafn Íslands/Háskólabókasafn, Erika Nielsen, Det Grønlandske Landsbibliotek, og Arnbjørn Ó. Dalsgarð og Martin Næs frá Føroya landsbókasavni. |
| 5. mai-4. juni | **Ein er søgan úr Íslandi komin**. Framsýning í Norðurlandahúsinum. Saman við Landsbókasafni Íslands/Háskólabókasafni varð skipað fyri framsýning av íslendskum miðaldarhandritum. |
| 2. juli-3. august | **J.P. Gregoriussen**. Framsýning um skaldið J.P. Gregoriussen. |
| 27. juli 2001-1. apríl 2002 | **Skaldið úr Skálavík. Heðin Brú 100 ár**. Framsýning av bókum, handritum og øðrum í sambandi við at 100 ár vóru liðin, síðan rithøvundurin Heðin Brú varð føddur. Óli Holm, landsstýrismaður, læt framsýningina upp 27. juli kl. 16. Bárður Jákupsson og Martin Næs hildu røður. Havnarkórið undir leiðslu av Ólavi Hátún sang Fedranna talu. Millum 300 og 400 fólk vitjaðu framsýningina teir fyrstu dagarnar. |
| 8. august-1. september | **Norðurlendsk fotokapping**. Í sambandi við Listastevnu Føroya 2001 varð skipað fyri norðurlendskari fotokapping. Innkomnu myndirnar vórðu sýndar fram. |
| 15. november | **Sangur og upplestur** í sambandi við Norðurlendsku bókasavnsvikuna. Sangur: Rytmiska kórið í Hoydølum. Upplestur: Páll Danielsen og Egi Dam lósu úr brævaskiftinum millum Heðin Brú og Chr. Matras. |
| 17. november-14. desember | **Framsýningin Norrøna felagið 50 ár.** |
| 18.-25. november | **Skaldið úr Skálavík. Heðin Brú 100 ár.** Partur av framsýningini á Landsbókasavninum varð settur upp í ungmannafelagshúsinum Kelduni í Skálavík. |

**Vitjanir**

| | |
|---|---|
| 20.-24. apríl | Örn Hrafnkelsson og Haukur K. Bragason, Landsbókasafn Íslands/Háskólabókasafn, og Erika Nielsen, Det Grønlandske Landsbibliotek. |
| 5.-8. mai | Einar Sigurðsson, Ögmundur Helgason, Kristin Bragadóttir og Emilia Sigmarsdóttir, Landsbókasafn Íslands/ Háskólabókasafn. |
| 8.-12. oktober | Hans Eric Büscher, Mikromarc, Danmark. |
| 9. desember | Óli Holm, landsstýrismaður, við fylgi. |

**Skeið. Fundir. Ferðir**

| | |
|---|---|
| 11.-14. januar | Durita Joensen á fundi í Keypmannahavn í sambandi við norðurlendsku bókasavnsvikuna. |
| 22.-25. februar | Martin Næs á fundi í Nordinfo í Helsingfors. |
| 6.-8. mars | Martin Næs á fundi í Nordbok í Keypmannahavn. |
| 22. mars-2. apríl | Mortan Hentze á ráðstevnu í London um nútíðar bókasavnstænastu á alnótini. |
| 6.-9. mai | Martin Næs á fundi í Nordinfo í Stokkhólmi. |
| 13.-19. mai | Durita Joensen á skeiði á Danmarks Biblioteksskole. Aktuel europæisk litteratur. |
| 19.-23. mai | Martin Næs á fundi í Nordbok í Helsingfors. |
| 25. juni-7. juli | Arnbjørn Ó. Dalsgarð á skeiði á Danmarks Biblioteksskole. Nordisk sommerskole. Det digitale bibliotek II. |
| 17.-28. august | Martin Næs á fundi í Nordinfo í Boston í sambandi við IFLA-ráðstevnuna 2001. |
| 10. oktober-14. desember | Sóleyg Kjærbæk á Tekniska skúla í Keypmannahavn. |
| 22.-25. oktober | Martin Næs á fundi í Nordbok í Helsingør. |
| 27. oktober-3. november | Mortan Hentze á fundi og ráðstevnu í Helsingfors. Førleikamenning og vitanarførleiki (Information literacy). |
| 20.-23. november | Erhard Jacobsen á skeiði hjá Mikromarc Danmark. Innkeyps- og tíðarritaskipanin. |
| 25. november-2. desember | Arnbjørn Ó. Dalsgarð á fundi í Nuuk í sambandi við Útnorðurverkætlanina. |
| 29. november-4. desember | Martin Næs á fundi í Nordinfo í Keypmannahavn. |

## Fólkabókasøvn

15 fólkabókasøvn eru í Føroyum. 13 av teimum eru smá og hava bert opið nakrar fáar tímar um vikuna. Samlaða bókatalið á hesum bókasøvnunum liggur úr 4.500 upp í einar 15.500 bøkur.

Á hesum bókasøvnunum starvast ikki yrkisútbúnir bókaverðir. Landsbókasavnið keypir og skrásetir bøkur fyri hesi bókasøvnini.

Landskassin rindar 60% av rakstrarútreiðslunum hjá fólka- og skúlabókasøvnunum. Í 2001 vórðu játtaðar kr. 4.208.000 á fíggjarlógtingslógini, sum vórðu goldnar fólka- og skúlabókasøvnunum í rakstrarstudningi. Føroya landsbókasavn ávísir fólka- og skúlabókasøvnunum rakstrarstudningin.

**Býarbókasavnið, Kollafjarðar bókasavn og skúlabókasøvnini í Tórshavn**

**Býarbókasavnið**

Á bókasavninum eru 3 deildir:

- útlánið
- lesistovan
- barnabókasavnið

Útlæntar vóru 68.776 (65.036) bøkur. Við í hesum talinum eru 348 (266) bøkur frá útlendskum søvnum.

Býarbókasavnið hevur samstarv um útlán við Ellisheimið, Hvíldarheimið Naina, Lágargarð og Varðhaldið.

Barnabókasavnið hevur samstarv um útlán við barnagarðar, vøggustovur og dagrøktarskipanina.

Býarbókasavnið eigur okkurt um 60.134 bøkur; íroknað eru barnabøkur, ljóðbøkur og handbøkur.

Bókasavnið heldur øll føroysk bløð og tíðarrit og eitt úrval av útlendskum bløðum og tíðarritum.

3 teldur, ið hava samband við internetið, eru til fólk at nýta.

Á barnabókasavninum eru 2 spæliteldur.

80.489 (79.075) vitjanir vóru í 2001.

Á Býarbókasavninum starvast býarbókavørðurin, 3 bókavørðir fulla tíð, 2 bókavørðir ¾ tíð, 1 bókavørður ½ tíð, 3 skrivstovufólk fulla tíð, 2 skrivstovufólk ¾ tíð og 1 skrivstovufólk ½ tíð - tils. 13 fólk í 11 størvum.

**Kollafjarðar bókasavn**

1. januar 2001, tá ið Kollafjørður fór upp í Tórshavnar kommunu, fór Kollafjarðar bókasavn at samstarva við Býarbókasavnið. Bókasavnið er bæði fólkabókasavn og skúlabókasavn. Á bókasavninum arbeiðir eitt fólk sum skúla- og fólkabókavørður.

**Skúlabókasøvnini í Tórshavn**

Samstarv er millum Býarbókasavnið og 7 skúlabókasøvn í Tórshavnar kommunu. Skúlarnir eru: Argja skúli, Eysturskúlin, Hoyvíkar skúli, Kommunuskúlin, Skt. Frans skúli, Skúlin í Kaldbak og Venjingarskúlin.

## Skúlabókasøvn

Landsbókasavnið hevur í 2001 ávíst trimum skúlabókasøvnum rakstrarstudning. Upp í hesi skúlabókasøvnini eru ikki roknað tey sjey skúlabókasøvnini í Tórshavnar kommunu, sum fáa rakstrarstudningin ávístan um roknskapin hjá Býarbókasavninum í Havn.

## Bókasavnsgjaldið

Á fíggjarløgtingslógini fyri 2001 vórðu kr. 950.000 játtaðar til bókasavnsgjaldið. Fyri at fáa bókasavnsgjald skal høvundur í minsta lagi hava 50 eintøk á bókasøvnunum. Bókasavnsgjald var goldið 189 fólkum - tilsamans kr. 633.333 fyri upprunaverk og kr. 316.667 fyri týðingar.

# Mikrofilmar

Yvirlitið sýnir, hvørji føroysk dagbløð og onnur bløð Landsbókasavnið hevur á mikrofilmi. Hesir filmar kunnu bert brúkast á bókasavninum, og tað ber til at taka ljósrit av tí, ið skal brúkast.

| | |
|---|---|
| 14. September | 1947-1994 |
| Alt um ítrótt | 1985-1986 |
| Baldursbrá | 1906-1912 |
| Dagblaðið | 1934-1992<br>1994-1995<br>1998- |
| Dimmalætting | 1877- |
| Eysturoyggin | 1986-1992 |
| FF-blaðið | 1972-1974<br>1976-1989<br>1991- |
| Fjarðbúgvin | 1971-1975 |
| Fríu Føroyar | 1983-1993 |
| Føroyatíðindi | 1915-1950<br>1952-1961 |
| Glaðustrok | 1968-1971<br>1973 |
| Losjutíðindi | 1982 |
| Norðlýsið | 1915-1920<br>1940-1944<br>1951-1964<br>1967- |
| Oyggjatíðindi | 1977- |
| Sosialurin | 1927- |
| Suðuroyar tíðindi | 1984-1987 |
| Tíðindablaðið | 1974-1975 |
| Tímin | 1943-1946 |
| Tingakrossur | 1901-1954<br>1960-1990 |
| Vikutíðindi | 1982 |

# Bókmentavirðislønir

Í september vórðu handaðar bókmentavirðislønir M.A. Jacobsens og barnabókaheiðursløn Tórshavnar býráð 2001.

M.A. Jacobsens virðisløn fyri fagrar bókmentir fekk Annfinnur í Skála og virðislønin fyri yrkisbókmentir varð latin Boga Hansen. Zacharias Hammer fekk virðislønina fyri mentanaravrik.

Barnabókaheiðursløn Tórshavnar býráð varð latin Maud Heinesen.

Á almennari samkomu í Norðurlandahúsinum, sum Mentamálastýrið skipaði fyri 22. oktober, fekk Eyðun Johannessen mentanarvirðisløn landsins og Fuglafjarðar sjónleikarafelag fekk nýstovnaðu heiðursgávu landsins.

# Bókaútgáva

Í 2001 komu 117 (170)[2] bøkur út á føroyskum máli - 69 (104) upprunaverk og 48 (66) týðingar. Samlaða talið av føroyskum bókum, síðan tann fyrsta bókin kom út í 1822, er sostatt 4.169 bøkur.

Tær 117 bøkurnar høvdu tilsamans 15.795 (29.808) blaðsíður og kostaðu tilsamans kr. 18.083 (24.756).

Bókaútgávan kann bólkast soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Skaldsøgur | 8 | (16) | 1 endurútg. |
| Stuttsøgusøvn | 3 | (3) | |
| Yrkingasøvn | 5 | (11) | |
| Sjónleikir | 1 | (4) | |
| Barna- og ungdómsbøkur | 41 | (37) | 1 endurútg. |
| Skúla- og lærubøkur | 11 | (24) | |
| Yrkisbókmentir | 48 | (75) | 4 endurútg. |
| | 117 | (170) | 6 (23) endurútg. |

Umframt hesar bøkur vórðu eisini givnar út:

37 (57) bøkur, skrivaðar av føroyingum á øðrum málum, skrivaðar um føroysk viðurskifti, ella sum onkursvegna viðvíkja Føroyum.

73 (86) bøkur, so sum árbøkur, jólabøkur, skemtirit, kort, álmanakkar, serprent, álit o.a.

4 (2) bøkur vórðu týddar úr føroyskum og útgivnar á øðrum málum.

Bøkurnar eru:

Oddvør Johansen: I morgen er der atter en dag. – Ebba Hentze týddi. - (*Ikki útkomin*)
Hanus Kamban: J.H.O. Djurhuus. - Kirsten Brix týddi.
Tóra Tóroddsdóttir: Klodsmajorer og englebørn. - Solveig Debess týddi.
Þóra Þóroddsdóttir: Að hreyfa sig og hjúfra. - Høvundurin týddi.

[2] *tølini í ( ) eru samsvarandi tøl fyri 2000*

## Týðingar

41% (38,8%) av føroysku bókaútgávuni í 2001 eru týðingar. Verður hugt eftir, úr hvørjum málum týðingarnar eru gjørdar, sær úrslitið soleiðis út:

| | | |
|---|---|---|
| 2,1% | (4,6%) | úr amerikonskum |
| 6,2% | (24,2%) | úr donskum |
| 41,6% | (24,2%) | úr enskum |
| 2,1% | (6,1%) | úr íslendskum |
| 14,6% | (10,6%) | úr norskum |
| 25,0% | (10,6%) | úr svenskum |
| 4,2% | (3,0%) | úr týskum |
| 4,2% | (16,7%) | úr øðrum málum |

## Prentingin

Av tølunum á talvu 1 sæst, at 53 av teimum 117 bókunum eru prentaðar uttanlands. Hetta svarar til 45,3% (35,9%) av bókunum.

Í prosentum sær myndin soleiðis út, hyggja vit at, hvussu nógv varð prentað uttanlands seinastu tíggju árini:

| | |
|---|---|
| 1992 | 53,0% |
| 1993 | 42,3% |
| 1994 | 35,7% |
| 1995 | 40,6% |
| 1996 | 36,4% |
| 1997 | 38,0% |
| 1998 | 33,1% |
| 1999 | 40,5% |
| 2000 | 35,9% |
| 2001 | 45,3% |

## Útgevarar

Teir størstu bókaútgevararnir í 2001 vóru

| | |
|---|---|
| Bókadeild Føroya lærarafelags | 44 |
| Føroya skúlabókagrunnur | 13 |
| Sprotin | 10 |
| Bókagarður | 5 |
| Mentunargrunnur studentafelagsins | 5 |
| Leirkerið | 4 |
| Fannir | 2 |
| Løgmansskrivstovan | 2 |
| Sosialurin | 2 |
| Steyrin | 2 |

## Nær í árinum komu tær 117 bøkurnar út?

| | |
|---|---|
| Januar | 8 |
| Februar | 6 |
| Mars | 11 |
| Apríl | 6 |
| Mai | 6 |
| Juni | 13 |
| Juli | 3 |
| August | 8 |
| September | 12 |
| Oktober | 14 |
| November | 16 |
| Desember | 14 |

## Bløð og tíðarrit

Í 2001 komu 64 (55) bløð og tíðarrit út.

## Avísir

Í 2001 komu 7 (6) avísir út.

*Dagblaðið, Dimmalætting, FF-blaðið, Fregnir, Norðlýsið, Oyggjatíðindi og Tíðindablaðið Sosialurin* komu regluliga út í árinum.

## Ljóðbøkur

Í árinum vórðu 19 ljóðbøkur givnar út á føroyskum. Talan er um føroyskar bøkur lisnar inn á bond ella fløgur.



Sverri Egholm
fyrrv. landsbókavørður
31/8-1930 – 24/1-2001

Tað var sum at hoyra eina bók detta av einari hill, tá ið boðini komu fyrramorgunin um at Sverri Egholm, fyrrverandi landsbókavørður, so brádliga var farin. Hesin hvølli bresturin, sum viðhvørt hoyrist inni á einum annars so friðarligum bókasavni, hekk hesa ferðina longur í luftini enn vanligt. Tað tóktist, sum vindeygu, veggir, loft og hillar vildu tala, men tey fingu ikki rættiliga orðið fyri seg.

Sverri tók prógv sum bókavørður í 1955, í einari tíð tá ið tað ikki vóru nógvir føroyingar, ið valdu sær hetta starvið sum lívsyrki, og tí kundi tað kanska, serliga tá ið tíðini, kennast heldur einsamalt at arbeiða í hesum yrkinum. Hann starvaðist á Landsbókasavninum í tveimum tíðarskeiðum: 1955-1963 sum bókavørður og frá 1968-1989 sum landsbókavørður.

Tað er einki at ivast í, at høvuðsverkið hjá Sverra á bókasavnsøkinum var byggingin av nýggja Landsbókasavninum seinnapartin í sjeytiárunum. Her legði hann alla sín sál, og meira aftrat í, tí hann vildi skapa ein virðiligan karm um ta føroysku bókaognina. Og hetta eydnaðist.

Sverri var ein óførur brævskrivari. Hann kundi gleða mangan mannin við tí skrivaða orðinum. Eg kundi tikið nógv dømi fram um hetta, men skal halda meg til tað eina:

Fyri skjótt tríati árum síðan skrivaði Sverri fyri Landsbókasavnið bræv til mann á bygd. Sum øll hansara brøv, so var heldur ikki her talan um nakað standard skriv, men eitt persónligt bræv við tignarligari byrjan, viðkomandi innihaldi og einum bjartskygdum enda, alt virðiligt og í navni stovnsins. Brævmóttakarin gav sær góðar stundir at umhugsa nevnda bræv og alt málið sum so, og nú fyri stuttari tíð síðan kom svarið. Í endanum av svarinum skoytti brævmóttakarin uppí: Heilsa Sverra Egholm og takka honum fyri áhugan í sínari tíð.

Tað er ikki meira enn ein góð vika síðan, at Sverri var inni á gólvinum á Landsbókasavninum, og eg fekk mint hann á brævið frá 1972 og borið honum heilsanina. Eg helt meg síggja í eygnakrókunum, at hann hugsaði sum so: so var tað brævið ikki skrivað til fánýtis, meðni. Men hann segði einki. Smíltist eitt sindur. Jú, hann mintist brævið.

Sjálvur kom eg at kenna Sverra í 1973, tá ið eg arbeiddi eitt ár á Landsbókasavninum. Síðan tá hava gøtur okkara mangan krossast, og altíð hevur tað verið tað skrivaða orðið, ið, á ein ella annan hátt, bant okkum saman. - Eisini nú henda dagin, tá ið vit hittust fyri seinastu ferð, og eg bar honum heilsanina frá Rikardi Danielsen og segði honum, at nú var handritið til bíbliutýðingina hjá Victor Danielsen komið í húsið.

Við hesum fáu orðum vil eg siga Sverra Egholm tøkk fyri tað, hann útinti til frama fyri ta føroysku bókina, og tað, hann gjørdi fyri at lívga um føroyska bókasavnsheimin, ið ikki altíð hevur verið mettur at hava so øgiliga átrokandi ábøtur fyri neyðini. Sverrasa partur lá ikki eftir.

Friður veri við minninum um Sverra Egholm.

Martin Næs
25/1-2001





# Saltið í rúkandi døgurðapottum!

**Tórbjørn Jacobsen**

***Røða hildin á Føroya landsbókasavni í sambandi við tiltak yrkingini til heiðurs, 21. januar 2001.***

Tá ið eg setti meg við knappaborðið, nakað fyri miðnátt í gjárskvøldið, komu skjálvta-herðindi á meg. Varnaðist nústaðni tá, hvussu lítið ein leikmaður kann bera einum átaki sum hesum. Men nú hevði eg játtað umbønini frá Martini, og so var eisini hendan náttin farin.

Tað er ringur ráðharraóvani at skriva røðurnar sjálvur. Hendan rasan livir sjáldan leingi. Strongdin tekur kvørkratakið, og so líðandi bløðir tú út. Á gravarbakkanum standa teir dystin lærdu, køldu heilarnir, ið duga hetta merkiliga kynstrið - at útdelegera. Hjá teimum flestu er politikkurin fak og metta, og ikki eitt amboð, í strembanini fram ímóti hugsjónarligum málum.

Smátt um smátt fløddi dirvið innaftur í æðrarnar. Kom at hugsa um aðru ferðina eg var uttanlands í almennum ørindum. Ein norðurlendsk mentanarráðstevna. Hildin í Svarta Gimsteininum í Keypmannahavn. Var ein av røðarunum, og tað mundi ganga so toluliga. Varð ið hvussu so er ikki pípaður av aftur pallinum. Í einum støðgi keypti eg mær tvey yrkingasøvn. Eftir Federico Garcia Lorca & Pablo Neruda. Sat og las í savninum "Los versos del capitan" hjá Pablo, tá ið danski mentamálaráðharrin kom og settist hjá mær. Vit kennast frá ídnum brævaskifti um rættarstøðuna hjá føroyska málinum.

Nú visti eg, at hon var frøðingur ella magistari í litteratursøgu, og tí kom tað ógvuliga óvart á meg, tá ið hon spurdi, hvør ið hesin Pablo Neruda var. Og tit síggja ivaleyst hesa løgnu seansuna fyri tykkum, har ið ein primitivur skipari av bygd í Føroyum situr og greiðir einum hámentaðum donskum ráðharra, frøðingi í bókmentasøgu, frá alrahelst størsta yrkjara, sum Latínamerika nakrantíð hevur fostrað. Í eina fjórðingsøld hevði eg borið kenslu á hann. So kanska eru føroysku koyggjurnar, í førum, líka so góð bókmentareiður, sum lærdu háskúlarnir á meginlandinum. Í hvussu er kókaði adrenalinið og eg setti meg aftur føran fyri at medvirka í hesum fína átakinum, sum eitt av lokomotivunum í landsins mentanarlívi, Martin Næs, landsbókavørður, so skynsamiliga hevur skipað fyri.

**Sjálvt despotarnir hava eina bleyta rók í sálini!**

Victor Hugo mundi ikki fara so heilt skeivur, tá ið hann segði, at ævinleikin býr í listamanninum. Politikaranum hevði hann ikki nógv gott at bera í so máta, helt hann ikki vera annað enn eitt deyðiligt produkt av sínari samtíð.

Men flestu politikarar hava eisini eina bleyta rók í sálini, har ið eisini yrkingar setast at rinda sær møðina. Sjálvt teir mest eirindaleysu despotarnir hava eitt sovorðið andaligt spísikamar. Eftir at Stalin var farin, funnu teir eitt pappír í skjalasavni hansara, har ið hann sjálvur hevði skrivað: "Hesir mega ikki nertast". Ovastur á listanum stóð tónaskaldið Sjostakovitj. Síðani kom ein longri røð av listamonnum - harímillum Eistenstein, Pasternak & Ehrenburg. Hann

gekk enntá ímóti littereru systembørnunum og trendinum, tá ið hann hálovaði hinum deyða Majakovskij, og segði hann at vera besta yrkjara, sum sovjetsamfelagið hevði fostrað.

Tað unikka og fantastiska við yrkingini er, at eingin kennir hin ævinliga sannleikan. Og tey flestu munna hava spurt seg sjálvan og onnur hendan relevanta spurningin: "Hvat er at yrkja?" Tað ger háskúlastjórin eisini. Maðurin sum bleiv heiðraður í hel. Ella yrkir hann uppí løður? Nær skulu vit vænta okkum hitt innispunna tógvið? - fyri at halda okkum í termunum hjá langabba hansara.

hvat er at yrkja?
tann ið dugir tað lærir tað aldrin
tann ið ikki hevur lært tað enn
hevur nokk altíð dugað tað

tað er at krógva seg
at krabba seg ímóti streyminum
at droyma í litum
pynta uppá eitt meistaraverk
við ósjónligum blekki
prógva at jørðin er fløt
fara í grind við skrivimaskinuni
fara til arbeiðis kl 4 um morgunin
vera bundin í 107 ár
selja sína sál til flutningsbandið
blomstra í sugguni
vegleiða tann síggjandi
villa tann blinda

vera navnleysur og analfabetur
stava seg ígjøgnum tað seinasta skríggið

vera eftirlitsmaður
á transsibirisku jarnbreytini
skriva brøv til rosu luxemburg
um eina superstar
ið vitjaði á nátt

leypa á bláman
og rópa einstein über alles
ella øvugt
um nakar mótmælir

vera kirurgur og klokkari
grava sína egnu grøv
eta fysikk og kemi til døgurða
misbrúka móðurmálið
til tað flennir í kíki

vera føddur
á eini aðrari planet
vera tann ævigi taparin
sum vinnur á øllum

## Men ongin sigrar á skaldskapinum!

Tað vælsignaða við yrkingini er, at dómstólurin er individuellur. Lærdur og ólærdur ræður sjálvur fyri tí, ið fæst burturúr. Andaligur streymasjógvur er og oftani fløktur sjógvur. Værmingar og vaggandi gjálv. Stríggið, tá ið ýtini onkuntíð kámast og kraftaverkini vilja brenna út. Men so skiftir sjóvarfallið aftur, og alt gongur meira makaleyst.

Yrkjarin, sum ikki er realistur, doyr. Og yrkjarin, sum bara er realistur, doyr eisini. Yrkjarin, sum er irrationellur, hevur tann keðiliga trupulleika, at tað er bara hann sjálvur, ið skilir seg sjálvan. Kanska unnustan skilir okkurt hissini. Og yrkjarin, sum bara er rationalistur, hevur tann trupulleikan, at sjálvt kýrnar skilja hann, og tað er ikki minni hugstoytt. Tað finnast eingir frymlar í hesum høpi, ið kunna loysast við tølum - har er einki tilfar, sum framman-undan er ásett av Guði ella Fana. Í skaldskapinum stríða hesar báðar personasjurnar ein ævin-ligan bardaga. Onkuntíð vinnur hin fyrri - aðrar tíðir hin seinri. Men eingin sigrar á skald-skapinum.

Ein Nobelvinnari í føgrum bókmentum hevur sagt, at sjálvandi verður yrkjarajobbið misnýtt. Tað ganga so nógvir yrkjarar fram á pall í hesum døgum, at skjótt verða vit øll yrkjarar og harvið doyr lesarin út. Tað verður kanska neyðugt at fara á lesaraveiði við rannsóknarhópum, ið á úlvaldabaki strúka fram ígjøgnum oyðimerkurnar ella sum spola fram og tilbakar á ský-loftinum - í smidligum loftsnældum.

Frumhugur menniskjans stendur til skaldskapin og haðani eru liturgi´in og sálmarnir komnir og eisini substansurin í øllum trúarlærum. Yrkjarin stríddist ímóti náttúrunnar fyribrigdum, og frá fyrstu tíð var hann eitt slag av presti, ið var kallaður. Hin modernaði yrkjarin í dag má súgva til sín úr dagligdegnum og mannalívinum fyri at rættvísgera yrkingina. Borgarligi yrkjarin er og verður samlíkur prestinum omanfyri. Fyrr sáttaðust teir við myrkrið - og í dag verða teir noyddir til at týða ljósið.

## Spreingiknøttar móti maktini!

Hin langleitti yrkjarin Yviri við Strond, sum ikki hevur verið hildin at verið av hesum borg-arliga slagnum, hevur verið so framsøkin, at hann hevur yrkt eina yrking um sínar egnu yrkingar:

Mínar yrkingar
skulu sveiggja í einum frumskógi av nalvastreingjum.
Uttan at banka uppá
fylla fornminnissøvnini við duldarfullum eygum.

Tær búnast í hugans einsligu gloprum
tamba seglini við mánalýsi og sangi
vermast millum bróst sum lukta av nátt og sveitta.

Yrkingarnar eru rekar.
Viðarbular riknir inn á grýtutar strendur.
Heilivágur hjá sorgini.
Spreingiknøttar móti maktini.
Saltið í rúkandi døgurðapottum.

**Christian - ein stútt og áhaldandi kraft!**

Omma mín ivaðist ongantíð í, at Christian Matras var Føroya klókasti maður. Ikki tí at hann var yrkjari, men heldur tí, at hann var tann einasti professarin, ið vit tá áttu. Maðurin er nú heima hjá fedrum sínum, men hevði hann livað, so var hann farin um 100-ára markið í hesum døgum. Og tað er eisini ein av orsøkunum til, at vit eru savnað her í dag.

Christian eigur nakrar av teimum flottastu setningunum í føroyskum skaldskapi. Sigl oyggj, fram úr mjørka. Her leikti tær lendið løg inn í sál. Eg fann teg í kvæðum, sum fólksins varrar lyftu úr øld í øld. Eg fann teg í orðum, sum møður mæltu stákandi inni við eld. Tú lerkur, sum stígur úr døgg upp um lond at boða øllum hirðum, at ljós er í hond. Hýkur dimmið mjúkt um hellulandið. Nú nemur náttin við smærur. Nú dimmir í blánandi líðum. Og lyndið er dæmt av heimalívi.

Og maður, ið fær tvinnað orð saman í so heilskaptar og fullkomnar setningar, er ikki hvør sum helst. Og yrkingarnar eru hareftir. Ein røð av ótíðarbundnum perlum, ið koma at standa fram til dómadag. Sjálvt um maðurin ongantíð stóð á geilarhornum og breiddi seg út um sínar egnu fortreffiligheitir. Í einari kronik sigur ein føroyskur yrkjari nakað soleiðis: “Tá ið fólk vestanfyri forelska seg í Japan, er tað í nógvum førum teirra arbeiðssemi, dissiplin og lítil-lætni, ið kenst tiltalandi. Í Føroyum eru hasar dygdirnar heldur ikki fremmandar. At vera lítillátin merkir ikki at fornokta sjálvan seg. Í føroyskum bókmentum umboðar Christian Matras handa andan fram um flestu onnur fólk ið skriva. Ein stútt áhaldandi kraft, ið gongur langt aftur í okkara gamla bóndasamfelag. Ein ektað kollektiv kensla, ið samstundis rúmar teimum flestu hugrákum. Sjálvt tá ið tað varð dansað, dansaðu okkara forfedrar kollektivt…………………………..”

Hesin viðingurin, sum varð samrøddur í sjónvarpinum fyri viku síðani, ivaðist ikki í, at nógvir føroyingar hildu, at Christian bara gekk niðri á asfaltinum og dagdroymdi og liraði onkra yrking av sær, tá ið tað hóskaði - soleiðis hissini. Og sjálvt um tað einki hevur við dygdina í yrkingunum at gera, so kann tað vera, at professaratittulin onkursvegna hevur legaliserað yrkjaran og givið honum ta tign, ið hann so søttliga hevði uppiborna. Hann er ein av teimum fáu profetunum, ið varð viðurkendur í livandi lívi. Og eingin ivingur er um, at hendan støðan ger hann til eitt jarnbrot í viðurkenningar-prosessini av føroyska yrkjarastarvinum. Honum hava landsins yrkjarar, og fyri alt tað, føroyska tjóðin - ikki so lítið fyri at takka.

Og omma mín man ikki hava verið so langt av leið í síni fatan av Christiani, tí longu tíðliga sýnir hann sítt dirvi og sítt intellekt. Skulu vit trúgva Williami, so var Matras bæði fríteinkjari og marxistur, tá ið hann kom til Havnar at ganga í skúla. Marsjeraði í havnargøtum saman við øðrum undir sprotareyðum flaggi, syngjandi kampsangin - Internationala. William, ið var missiónskur - ræddist. Øtaðist, tá ið Matras tosaði um “kammerat Lenin” og “kammerat Trotzky”, og tá ið hann við ovurhuga umrøddi hina russisku revolusjónina. Men, sum hjá teimum flestu, so koma nýansurnar við aldrinum. Og tað hendi eisini hjá Christiani.

Hin ateistiski og bolsjevikiski unglingin gjørdist so líðandi til vitskaparmann og til føroyskan patriot. Týddi Petter Dass og Thomas Kingo, Brorson, Grundtvig og Ingemann. Og hvat ið sosialum og politiskum sjónarmiðum viðvíkir, so viku so smátt allar víðgongdar hugsanir fyri tí einu og somu: fosturlandskærleikanum - kærleikanum til føroyskt mál, føroyska náttúru og fólkaminnir, føroyskan anda og list.

Men hesin skúlin í religiøsari frígering og menniskjaligari samkenslu, sum Christian Matras gekk ígjøgnum í sínum dreingja- & ungdómsárum, hevur sett sítt týðiliga merki á hansara skaldskap. Her ræður ein frígjørd religiøs kensla - frígjørd fyri bond og fyrisetanir, ókon-

fessionel; og her finna vit eisini eina menniskjaliga samkenslu í stórt mát, frígjørd fyri øllum staðbundnum ella nationalistiskum smásinni. Yrkingarnar hjá Christiani eru allar um Føroyar - ja, í grundini bert um eina av oyggjunum: hansara føðioyggj. Men hvør einstøk yrking hevur perspektivir út ímóti tí alheimska og tí almenniskjaliga. Tak t.d. yrkingina "Kvøld". Havmyrkrið leggur seg ikki bara um hina lítlu Viðoynna. Tað er eisini kvøld um allan heimin. Tað er tann ragnarøkurskensla, eitt menniskja kann kenna í sinninum, annaðhvørt tað er Viðingur ella Mexikanari - ella ein frá San Fransisco ella Bucuresti:

Nú sorast smátt í sinnum foldarverk,
Nú skakast tryggar grundir undir døgum
øll flusnar foldartíð, sum áður sterk
stóð fevnandi um knøtt við sínum søgum.

Hin stóri kunsturin hjá Christiani Matras, sum skald, er fyri ein part, at hann leggur hetta perspektivið inn í sína yrking, uttan samstundis at beina fyri tí staðfesta stemninginum. Yrkingin verður sostatt bæði føroysk og almenn-menniskjalig. Og fyri ein part er kunstur hansara eisini tann, at hann er førur fyri at gera yrkingina religiøsa í alrabesta týdningi, uttan á nakran hátt at gera hana gudiliga ella missiónska.

**Tað hvílir ein stór ábyrgd á herðum yrkjarans!**

Umframt sína egnu natúru hevur yrkingin so nógv annað í sær - ella kann hava. Hon kann nýtast sum samfelagsins renovatiónsarbeiðari, men eisini sum vápn í einum góðum stríði. Tak verkamanna- & tjóðskaparrørsluna. Skalt tú sigra í stríði, mást tú antin drepa ella broyta tankagóðsið hjá mótstøðumanninum. Yrkingin hevur verið ein av stabbunum, sum hesar rørslur hava staðið á. Hygg bara at Føroya fólks songbók - ein lovsongur til tjóðina. Og ávirkanin hevur ikki verið so lítil heldur. Ávegis sigurin heldur ikki. Tað er bara góð hálv øld síðani føroyskir skúlar sambært fremmandari lóg ikki máttu geva frálæru í okkara egna móðurmáli. Koloniala maktin ræddist máttin í málinum. Varð givið eftir, so visti hon tað, at stríðið vildi flyta seg til uppgerðina um hitt endaliga valdið. Og tað er akkurát har vit standa í dag. Kostirnir eru tvinnir. Bara annar er gongin. Tað má røkka ella støkka. Nú. Konsensus-møguleikin finst ikki í einum tjóðskaparstríði. Hugsi tykkum, hvat ið var hent kristindóminum, um apostlarnir í sínari tíð vóru farnir út á øll strætir og høvdu fráboðað fjøldunum, at teir trúðu á ein ella annan konsensus í trúarmálum?

Yrkjarin hevur eisini skyldur. Stórar skyldur. Hann umboðar fimta statsvaldið, ið skal reinsa upp í samfelagsins øskudungum - áhaldandi. Tað hvílir ikki so lítil ábyrgd á herðum hansara. Og hann eigur ongantíð at lata seg kompromitera, heldur ikki av tí stuðli, ið samfelagið letur mentanarlívinum. Hetta krevur dirvi. Eitt dirvi, sum er neyðugt, skal fólkaræðið tryggjast út í ytstu lið. Tað er ikki altíð víst, at tað verður gamansleikur at fara í takholt við korrumperaðar korridor kóvboy´arar úti undir samfelagsins døkku væðingum, men verður hetta ikki gjørt á ein konstruktivan og ærligan hátt, tá dettur samfelagið sundur. At vera samfelagsins ringa samvitska krevur ikki so lítið. Tað verða nógvir baldrutir túrar, men hetta er neyðugt fyri at halda samfelagsins oddvitum á kósini og fyri at halda fast um moralin, ið heldur samfelagnum saman og uppi. Komi at hugsa um kenda troubadurin Bob Dylan. Fleiri ár fyri, at ungdómsuppreisturin fór sum ein grasfløtueldur um allan vesturheimin, yrkti hann hetta ørindi:

Come senators, Congressmen
Please heed the call
Don´t stand in the doorway
Don´t block up the hall
For he that gets hurt

Will be he who has stalled
There´s a battle
Outside and it´s raging.
It´ll soon shake your windows
And rattle your walls.
For the times they are achanging.

Og tá ið eingin varnaðist álvaran í orðunum, eingin tók stig til at umskipa og opna samfeløgini, hendi júst tað, sum Bob hevði ávarað um - í góðari tíð frammanundan.

**Urmegin sigrar - hóast ellið boyggir og sjónin brestur!**

Nú rennur tíðin undan. Og hvør skuldi eisini orkað at lagt oyru til eina longri svadu um yrkingar frá einum, ið einki skil hevur á slíkum. Men tað hvílir eisini ein ábyrgd á mentamálaráðharrum. Berið yvir við mær.

Tað er eingin sum ivast í, at yrkingin hevur fingið eina renesansu í Føroyum. Tað tóktist sum hóttafall var komið á. Arvurin eftir stóru yrkjararnar í romantisku tjóðskapartíðini kendist ov tungur at bera. Har stendur ein gjógv. Nú grør aftur um gangandi fót. Hetta vísir urmegina í báðum yrkjara og í yrkingini. Kendir eru fleiri, sum ikki helmaðu í, heldur ikki tá ið fysisku skipbrotini komu. Tá ið ellið boygdi og sjónin brast.

Jean-Paul Sartre varð starblindur, tá ið hann kom uppí ellisár, og tá ið hann fór um sjeytiáramarkið, segði hann soleiðis við franska blaðið Nouvel Observateur: "Møguleikarnir hjá mær sum skrivandi manni eru foknir med alla. Eg havi verið - og eri ikki meira. Eg átti at verið totalt útsligin. Eg trívist rættuliga væl, men orsøkirnar til, at so er, skilji eg ikki. Eg verði hvørki hugtungur ella melankolskur, tá ið eg hugsi um, hvat ið er tikið frá mær. Tað hava verið nógvar tungar løtur. Tað einasta, ið nú er at gera, er at laga seg til tað, ið eg eri blivin". Men urmegin sigraði eisini á Jóan Paula. Eftir hetta var hann ein av teimum, sum fekk eitt tað størsta framtakið í franskari pressu, í nýggjari tíð, av bakkastokki - avísina "Libération".

**Slagið stendur ímillum kjøt og anda!**

Í bløðunum ger ein pensioneraður pantifúti gjøldur burtur úr stóra argentinska kollveltingarmanninum Che Guevara. Myndin í føroyska mentamálastýrinum verður tikin framaftur. Í greinini er hann íblástur av einum stokkonservativum donskum ummæli, av eini bók um legenduna, har ið politiska halgimennið verður meiri styrkt enn viknað. Veit ikki, um Che var ein slíkur, men eg komi aftur at hugsa um hesar eymu røkurnar, sum eisini finnast í sálarlívinum hjá politiskum despotum. Sartre og Che hittust í Havanna. Og hesin siviliseraði vesturlendingurin helt hann vera hitt mest fullkomna menniskjað hann hevði hitt. Neruda og Che hittust eisini. Í cubanska tjóðbankanum. Á skrivstovuni sat stjórin víðgirdur í feltuniformi, og helst hugsaði hann meiri um komandi slagmarkir enn um hitt cubanska peningaumfarið. Regis Debray fortaldi seinri hesum kenda kilienaranum, at tað vóru tvær bøkur í feltsekkinum, tá ið amerikanskir leigusveinar skutu hann uppi í boliviansku fjøllunum. Ein frálærubók í støddfrøði og fræga yrkingin hjá Neruda: Hin stóri sangurin. Eitt slag av tjóðkvæði hjá øllum latínamerikanarum í dag.

Visiónin er kjøt
segði hønan við hanan
ein eggleysan dag.

Hetta er Tóroddur, tá ið hann er bestur. Harímillum liggur hitt politiska spektrið. Kjøt og anda. Búk og hjarta. Myrkur og ljós. Og tað fer tað altíð at gera, so leingi menniskjað er ein partur av foldarlívinum. Og harvið verður yrkjarin ongantíð arbeiðsleysur. Koyrið á og stingið ikki upp fyri nøkrum. Hvørki høgum ella lágum. Tað hvílir ein tung ábyrgd á tykkara herðum, tit samfelagsins vitar í døkkum stundum.

Til seinast tøkk til øll tykkum, bæði farnum og livandi, ið góvu mær íblástur til hesa røðuna.



# At hava grein í sínum máli

Hugleiðingar um bókasøvn og frálæru

**Erhard Jacobsen**

I

Tað liggur ikki til føroyingin at vera heimsspekingur. Ikki tí, vit hava nógvar heimsspekingar, sum avgjørt ikki smæðast burtur, men nakað háfloygt ástøði ella nakrar hugans katedralar, tað skulu vit tó neyvan vænta okkum enn á sinni. Tað er sum Grundtvig skrivaði: *vi er ej skabte til højhed og blæst, ved jorden at blive, det tjener os bedst*.

Og tað skuldi heldur ikki verið neyðugt at lopið framav, tá ið vit næstan dagliga fáa váttan fyri, at vit teljast millum tey, sum veruliga eru nakað í heimssamfelagnum.

Nú kanska onkur hevur hug at tala at, tí er tað nakar, sum hevur lagt nógv fyri, tá ið neyðin stóð í durunum, so er tað føroyingurin. Tak bara okkara fiskimenn móti endanum á 19. øld og eisini í júst farnu øld. Ella tær konur og mammur, sum mangan við ekka og stríð hildu hús og uppaldu børnini, meðan pápin var burtur. Heldur ikki eiga vit at gloyma, at tað, sum føroyingar, teir flestu meinigir fiskimenn, lærdu, eitt nú á landi í Grønlandi fyrst í sekstiárunum, seinni varð brúkt heima í Føroyum til at menna føroyskt vinnulív og venda vánatíðum til vælferð.

Tað hevur kanska ikki verið so nógv prátað um hetta, men vit í okkara marglætistíð eiga tó ikki at gloyma, at tað vóru aðrar tíðir.

Og bókasøvnini, ella vit kunnu heldur siga søvnini sum heild, eru jú, sum onkur hevur málborið seg, okkara felags minni.

Kanska eru vit føroyingar bara pragmatikarar, sum hava ta áskoðan, at tað nyttar onki at leita eftir sannleikanum um heimin, náttúruna og tilveruna; tað einasta vit eiga at stremba eftir er vitan, sum virkar, og hættir, sum vit kunnu brúka til okkurt. Vitan og dugnaskapur er tað, sum ger mun, og so má sannleikin bíða til onkran annan dag.

Heðin Brú sigur frá einastaðni, at tá ið skúlarnir komu, hildu tey eldru, at teir "dugdu [ikki] at læra børnini tað, sum trongdi til fyri at lívbjarga sær og liva sum umhildin fólk í bygdini, nei, tað vóru tey eldru, ið hetta skuldu læra tey ungu"[1]. Tá á døgum var eisini umráðandi at vera skilafólk[2].

Royndir hava kortini víst okkum, at hóast skúlalærdómur tá í tíðini var hildin at vera óneyðugt luksus, so smíkti hesin lærdómur seg kortini inn á okkum, tí brúk var fyri honum. Tú komst heldur ikki um høvini, hevði tú ikki eitt sindur av skúlalærdómi. Og síðani hevur skúlalærdómur bara vundið uppá seg.

---

[1] *Heðin Brú: Hitt gamla bóndasamfelagið. - Í: Føroyar, bd. I. - Givið út hevur Dansk-færøsk Samfund. - Keypmh., 1958, s. 266.*

[2] *Ibid, s. 262: "Maður var minni mettur eftir tí, hann átti, enn eftir tí, hann dugdi. Eingin spurdi eftir, um miðamaðurin, bakkamaðurin, seyðamaðurin átti fótsmál, var hann skilamaður, var hansara umdømi gott og rótfest".*

Nú er tó við at venda aftur. Í okkara fløktu tíð, har skilnaðurin millum útbúgving, frítið og arbeiði er um at kámast burtur, samstundis sum munurin á nær og fjar minkar, og alsamt styttri verður millum gamalt og nýtt, tykist ivi hava tikið seg upp um, hvussu vit skulu fóta okkum. Og samstundis er eitt nýtt og meira víðfevnt lærihugtak um at taka seg fram. Júst tann áður nevnda sameiningin millum at *vita* og at *duga* er aftur komin í miðdepilin, men nú á einum øðrum og øðrvísi vitanarmóti.

Í dag er vitan í sjálvum sær ein anakronisma (fornleivd), sum onga nyttu ger, um tú ikki samstundis dugir. At vit hava brúk fyri skipaðari ella niðurfeldari vitan er eyðsæð, tí bara at goyma vitan ("søguna") í dreingja sinni og moyggja, tað kann vera svikaligt.

Men hvussu definera vit so tað at duga? At duga vil siga at taka tøk við heimin og brúka vitan - ikki bara bókliga, skipaða vitan - men eisini óskipaða ('tacit'[3]/fjalda) vitan, og ikki minst at brúka hesar vitanarkeldur sum amboð í framhaldandi læru. Tað er gott at duga væl í skúlanum, men hetta er ikki altíð tað sama "duga", sum at duga at súkkla, binda, svimja, lesa, gera mat ella okkurt líknandi. Hoyrdi eg nakran siga at duga gand? Tað er ikki nóg mikið at vita ella hava kvalifikatiónirnar, tú skalt eisini duga: tvs. vera kompetentur ella virkisførur, skalt tú klára teg í dagsins samfelag.[4]

Vit læra av royndum og vinna so líðandi innlit í fyribrigdi, sum koma fyri í okkara gerandisdegi, í samfelagnum og í okkara arbeiði. Jean Lave og Etienne Wenger, sum eru upphavsmenn til hugtakið "situated learning", siga um hetta m.a.:

> "Learning viewed as situated activity has as its central defining characteristic a process that we call *legitimate peripheral participation*. By this we mean to draw attention to the point that learners inevitably participate in communities of practitioners and that the mastery of knowledge and skill requires newcomers to move towards full participation in the sociocultural practices of a community".[5]

Spurningurin er, um vit ikki nú verða noydd at síggja læring ikki bara sum frálæru, men heldur sum menning (verkliga og andaliga menning) ella sosialisering, sum tað eisini verður rópt við einum fínum orði. Og er tað ikki eisini í hesum, at vit skulu finna upprunan til nýggja hugtakið *førleikamenning*, sum er annað enn bara at senda fólk á skeið.

Í dag verður eisini nógv tosað um veruleikastýrda frálæru, tvs. frálæru, sum tekur støði í málum ella trupulleikum, sum næmingurin rennir seg í bæði sum einstaklingur og sum samfelagsborgari, og sum hann skal royna at loysa. Í hesum frálæruhátti eru eitt nú evnisgreining (‘problemformulering’), verkætlanarstýring, metoda (at savna inn og meta um informatión og gera niðurstøður), at skriva frágreiðing (rapport) og at leggja fram týðandi tættir í frálæruni.

Endamálið við slíkari frálæru er helst, at næmingurin í størri mun skal skilja ein hóp av skipaðum og óskipaðum hendingum, fyribrigdum og tiltøkum, sum koma fyri bæði innan fyri og ikki minst uttan fyri skúlagátt. Á tann hátt lærir næmingurin eisini, hvussu hann skal føra seg fram, koma sær fram, finna sítt støði (positionera seg), ella klára seg í samfelagnum. Tann, ið

---

[3] *Tacit merkir sambært orðabókunum tigandi. Vit tosa um 'tacit knowledge', tvs. vitan og kunnleiki ella kanska heldur førleiki, sum hvør goymir inni við seg, og sum ikki er so lættur at flyta frá einum til annan. Hinvegin hava vit 'explicit knowledge', ið er vitan sum er niðurfeld (codified), sum er løtt at flyta og endurtaka; vitan, sum er skipað og goymd á onkrum miðli ella fest á blað.*

[4] *Virkisførleiki (tý. Handlungskompetenz) fevnir um ymisk hugbrigdi. Ein áhugaverd viðgerð av evninum læring og førleiki er bókin hjá Lars Qvortrup: Det lærende samfund. Hyperkompleksitet og viden. Kbh., Gyldendal, 2001.*

[5] *Jean Lave & Etienne Wenger: Situated learning. Legitimate peripheral participation. - Cambridge, 1999 (fyrsta útg. 1991), s. 29.*

ikki alla tíðina gáar eftir, kann skjótt enda í einari av niðaru deildunum, ella í ringasta føri á áskoðaraplássunum.

Tað eru altso ikki fakta, sum er tað avgerandi, sjálvt um vit sjálvandi ikki kunnu avnokta týdningin av fakta, men heldur *prosessin*: hvussu væl dugir tú at læra, tvs. á skipaðan hátt at brúka ymiska vitan í eini sonevndari læruprosess, hvussu tulkar tú støðuna, sjálvt um hon ikki er eintýdd, og tolir tú at liva við óvissuni?

Kanska eiga vit at hava hesi viðurskifti í huga, tá ið vit spyrja, um børnini læra nakað í skúlanum!

Men mitt í øllum hurlivasanum eiga vit tó ikki at gloyma vandan fyri, soleiðis sum vit eisini kundu hóma tað í brotinum eftir Heðin Brú omanfyri, at stað- og tíðarbundin (kontekstbundin) vitan hevur lyndi til at elva til trongskygni. Tað sama kann sanniliga gera seg galdandi í dag, nú vit kappast um at seta ikki bara fólk, men eisini vitan í bás. Í dag eru vit hótt av eini flóðaldu av informatión, so høg ella vit áttu kanska heldur at sagt upptúsnað, at hon meira elvir til líkasælu enn til umhugsni. Í slíkum føri, tá ið onki skal takast í álvara, kann tann, sum ikki fer lættliga um, men gevur sær stundir at lýsa málið út í æsir, skjótt enda sum ein løgin snigil. Men hvat nyttar tað at læra at læra, um tú onki veitst?

Nú kanska onkur heldur, at hesin lestur meir og meir er farin at líkjast eini sorgarsøgu um framburðin, sum drepur mentanina. Ein søga, sum er søgd so ofta, at tú ivast í, um hon er eftirfarandi. Lesið bara Rousseau, Kierkegaard, Marx, Nietzsche, Freud, Weber, Ortega y Gasset, Adorno & Horkheimer, Riesman, Marcuse, Postman, Lasch, Poul F., Janus, Hanus o.fl. Sanniliga eitt tema við variatiónum!

Men álvaratos, tá ið saman um kemur - munnu so ikki onnur hava størri grund til at syngja harmaljóð enn júst mentanin, sum tykist at trívast avbera væl hóast stóran framburð, hvussu vit nú enn máta hetta fyribrigdið? Nei, eg spyrji bara.

II

Uppfatanin av, hvat eitt fólk heldur hevur týdning, sæst aftur í tí, sum tey velja; hvat leggja tey dent á, hvussu húsast tey við síni tíð og sínum peningi, hvat vilja tey skal síggjast, og hvat halda tey eigur at sleppa at sigla sín egna sjógv? Tað sama ger seg í grundini galdandi fyri eina tjóð. Sjálvandi kunnu tíðirnar broyta møguleikarnar fyri, hvat fólk kunnu velja, men valið er til eina og hvørja tíð eisini treytað av, hvussu væl útgjørdur tú ert við handaligum og andaligum kapitali.

Franski sosiologurin Bourdieu tosar í hesum sambandi um hugtakið "habitus", ið er tað, sum verður lagt niður í okkum longu í barnaárunum og treytar okkara lívsleið og virkar sum atgongumerki og viðhvørt sum stik um samfelagsliga leikpallin hjá hvørjum einstøkum. Aðrir minni bjartskygdir hava kallað hetta fyri "sosiala arvin". Vit kunnu spyrja, um hugtøk sum ”habitus” ella ”sosialur arvur” ikki longur eiga innivist í tí, sum nú verður rópt tað hyperkompleksa samfelagið, har allar dyr standa opnar, so at valið verður so mikið torførari, av tí at ov nógvar dyr eru at fara um. Okkurt bendir tó á, at tað neyvan er so.

Og hvønn týdning fær so alt hetta nýggja fyri politikk, demokrati, tolsemi ella solidaritetin, sum vit einaferð løgdu so stóran dent á. Tí í eini tíð við einstaklinga- og alheimsgerð, har tað snýr seg um at duga at snúgva sær (at fata ella tulka støðuna rætt o.s.fr.), og har øll vilja hava valfrælsi og nærum óavmarkaðar virkismøguleikar, har tykist tað alsamt hava minni týdning, um nakar hevur grein í sínum máli. Bara tú riggar, sum maðurin segði!

Vit vita annars, at skúlin hevur havt sum eitt av sínum aðalmálum at verja sosialu dimensiónina, sum er týðandi partur av allari frálæru. Men hvat nú, tá ið ein alt størri partur av læruni fer fram leysur av skúlanum ella í einum øðrum lærihøpi, enn vit eru von við? Hvør tekur sær tá av teirri sosialu dimensiónini?

Eitt er í hvussu er vist. Tey, sum eru vald at stýra, sleppa so ikki undan at velja í hesum tíðum og heldur ikki í hesum máli.

III

Nú var tað ikki ætlanin, at hetta skuldi enda sum hugleiðingar um, hvussu tað er at vera nútímansgjørdur føroyingur, tó at tað eisini er ein áhugaverdur spurningur. Og eru tað ikki júst føroyingar - allir føddir einstaklingar, sum eru teir røttu heimsborgararnir.

Og um so er, skuldi verið lagamanni!

Nei, ætlanin var bara soleiðis hissini at seta á blað nakrar tankar um sambandið millum bókasøvn og frálæru. Drúgvu hugleiðingarnar omanfyri skuldu bara minna okkum á, at tíðirnar broytast, og av hesum koma nýggj krøv, ikki minst til bókasøvnini, sum sambært serfrøðingum eiga at hava fingið ella fara at fáa eina lyklastøðu í kunningarsamfelagnum. Tað verða bókasøvnini, sum fara at handfara ein týðandi part av teirri vitan, sum nú er savnað í støðugt størri nøgdum hesi seinastu nógvu árini. Vitan, sum nú fyri ein stóran part er atkomilig uttan mun til tíð og stað.

Læring kemur tó ikki av sær sjálvari. Tað kann væl vera, at vit hava tilfeingið (skúlar, bókasøvn, KT-útgerð, lærupláss o.s.fr.), men verður eingin roynd gjørd at føra hetta spjadda tilfeingið saman í eina heild, so verður tilfeingið ikki brúkt til fulnar. Hetta talar fyri, at vit eiga at royna at fáa í lag eitt samstarv millum tey, sum skipa fyri frálæru, tey, sum starvast við at leita eftir upplýsingatilfari um ávíst evni, og tey, sum duga at handfara KT.

Onkur hevur borið upp á mál, at ikki minst bókasøvnini mugu fara at hugsa øðrvísi.[6] Tey eru ikki bara tænastustað, men eiga at fáa medábyrgd fyri læring við teimum avbjóðingum, tað hevur við sær.

Bókasøvn, ið kundu samanberast við krambúðir, sum høvdu vørur ella bøkur á goymslu at útflýggja eftir umbøn, munnu vera við at fara í søguna, og at hitta fólk, sum lesa bøkur fyri at hava eitt vist mentanarligt støði, tað man vera rár hending. Hinvegin er tað týðuligt, at tað er komið eitt støðugt fastari samband millum bókasøvn og frálæru, og at bókasøvnini gerast amboð, tá ið okkurt, ið hevur meiri praktiskan dám, skal avrikast.

Tað hevur eisini leingi verið greitt, at skúlin og bókasavnið í ov stóran mun hava verið hvørt sítt. Lærarin heitir kanska á næmingarnar um at fara á bókasavnið eftir tilfari, men gevur sær ikki far um, hvussu hetta tilfarið verður fingið til vega, og bókavørðurin roynir eftir førimuni at finna tilfarið, men leggur seg annars ikki útí, hvussu tað verður brúkt. Í vitanar- og kunningarsamfelagnum eigur slíkt ikki at koma fyri. Alt talar tí fyri einum nýggjum samspæli

---

*[6] Carol Collier Kuhlthau skrivari í bókini Seeking meaning (1993): "The traditional bibliographic paradigm, centering on the location of sources, is no longer adequate for accommodating the full range of users' problems in the information age. The traditional approach is limited to the task of locating sources and information but does not take into account the tasks of interpreting, formulating, and learning in the process of information seeking. Increased access to vast amounts of information requires services that center on seeking meaning rather than merely on locating sources." (s. 168)*

millum lærara, næming og bókavørð, í hvussu er, tá ið talan er um skúlabókasøvn ella bókasøvn á hægri skúlum. Bókavørðurin noyðist so at vita eitt sindur um námsfrøði og vinna sær førleika at læra frá sær[7].

Í hesum sambandi er tað ikki minni týdningarmikið at viðgera støðuna hjá teimum, sum skulu brúka upplýsingarnar ella kunningina, tað veri seg lánarar, næmingar, lesandi og onnur. Vit tosa her um at hækka kunnleikastigið hjá øllum aktørunum í læriprosessini. Tað er neyðugt, at tann parturin av frálæruni, ið er skipað sum verkætlan ella uppgáva, og sum snýr seg um at leita eftir tilfari[8], verður tikin i álvara av øllum pørtum. Norski bókasavnsfrøðingurin Hans Martin Fagerli sigur um hetta m.a.:

> "Et læringscenter oppstår først når et læringsressurssenter[9] settes inn i en bevisst pedagogisk sammanheng. Med bevisst mener jeg at bibliotek- og IT-ressurser blir en obligatorisk del av et utvidet pensumbegrep hvor *bibliotek- og IT-ferdigheter tilhører læringsmålene*. Dette i motsetning til dagens situasjon hvor bibliotekressurser og IT-verktøy langt på vei kan sies å være et tilleggstilbud og dermed i hovedsak benyttet av de allerede ressurssterke brukerne".[10]

Tað sigur seg næstan sjálvt, at verður hugtakið "læridepil" til veruleika, so fer tað at broyta arbeiðið hjá bókavørðinum og toga hetta arbeiðið meiri yvir ímóti vegleiðara ella lærara, men hetta fer sanniliga eisini at broyta arbeiðið hjá øðrum starvsbólkum, soleiðis sum vit umrøddu tað omanfyri. Tað fer eisini at gera, at høga stikið millum starvsgreinir má lækkast.

Seinastu árini hevur nógv prát verið um nýggju tøknifrøðina. Serliga hetta at kunningartøknin, KT, m.a. hevur broytt arbeiðshættir, ið hava við umsiting av vitan at gera. Í veruleikanum er menningin av KT ein avleiðing ella partur av meiri víðfevndum samfelagsbroytingum. Tí ber illa til at umrøða KT og frálæru uttan samstundis at taka støði í eini samfelagslýsing, ið tekur við tær samfelagsbroytingar, sum hava ført við sær eitt nýtt lærihugtak.[11]

Tað eigur eisini at nevnast her, at tað hevur víst seg, at tað loysir seg ikki at undirvísa í KT, uttan at frálæran samstundis er tengd at onkrum, sum KT skal brúkast til. Hetta hevur við sær, at KT má vera ein náttúrligur partur av frálæruni í flest øllum lærugreinum í skúlunum, um tað skal muna nakað og føra til tað, sum kann rópast kunningarførleiki ('information literacy').

Kunningarførleiki er júst eitt av hesum nýggju fyribrigdunum, sum nógvur hávi verður gjørdur burturúr, so nógvur, at tað viðhvørt kann vera ringt at vinna inn til kjarnuna í málinum. Ein teirra, sum hevur arbeitt nógv við kunningarførleika ella 'information literacy', bókavørðurin Christine Bruce úr Australia, hevur givið eina rættiliga beinrakna lýsing av hesum fyribrigdi.

---

[7] *Peter Gorm Larsen: Samspilstrekanten mellem lærer, bibliotekar og elev/studerende på uddannelsesinstitutioner. - DF-Revy 2000/1, s. 23-27.*

[8] *Verkætlanaruppgávur eru nú partur av útbúgvingini í flestu hægri útbúgvingum, eisini í 9. og 10. flokksstigi í fólkaskúlanum. Sí t.d. Kunngerð um verkætlanaruppgávuna, nr. 114, 22. nov. 2000. (http://www.logir.fo/foldb/kunfo/2000/0000114.htm).*

[9] *Kann samanberast við nýggja hugtakið Open Learning Center.*

[10] *Hans Martin Fagerli: En arena for læring og samarbeid, s. 19.*

[11] *Sí: Gunnar Eggert Jørgensen og Poul-Erik Banff: På vej mod et nyt Læringsbegreb. Om brug af computere i folkeskolen (...) Kolding, CUTA, maj 2001.*

Hon skrivar:

> "Information literacy is usually described as the ability to locate, manage and use information effectively for a range of purposes. As such it is an important 'generic skill' which allows people to engage in effective decision-making, problem solving and research. It also enables them to take responsibility for their own learning in areas of personal or professional interest."[12]

Júst hendan lýsingin vísir, at kunningarførleiki er eitt fyribrigdi, sum avgjørt ikki kann undirmetast. Hinvegin bendir nógv á, at hesin førleiki ikki hevur breitt seg nakað, sum er vert at nevna. Men við so mongum øðrum, so eisini við hesum: tey, sum halda seg hava brúk fyri hesum førleika og longu vita hvussu, skulu nokk vita at tryggja sær hann. Trupulleikin er bara, at nógv, og ikki bara tey veikastu, fara kanska ongantíð at frætta um hendan førleika, tíansheldur fer nakar at krevja tey eftir prógvi um henda førleika, og rætt skal vera rætt: – tað er heldur ikki lívið um at gera at hava henda førleika.

Áður nevnda Christine Bruce hevur annars eina rættiliga áhugaverda útgreining av, hvat hon heldur eyðkenna kunningarførleika. Í greinini *Seven Faces of Information Literacy in Higher Education* lýsir hon hetta hugtakið og vísir á, at kunningarførleiki formliga kann sundurgreinast í fleiri tættir.
Kunningarførleiki kann tískil snúgva seg um

1) kunningartøkni
2) kunningarkeldur
3) kunningaratferð (*prosess*: hvussu brúka vit kunning/upplýsingar/informatión, tá ið vit loysa trupulleikar ella taka avgerðir)
4) kunningarfrøði (dátuviðgerð, skráseting, leiting o.s.fr.)
5) vandalig handfaring ella viðgerð av kunning/upplýsingum/informatión
6) at brúka informatión í royndunum at skapa nýggja vitan og
7) at meta um informatión í einum størri høpi (sosialt, siðfrøðiliga o.s.fr.).[13]

Hetta bara fyri at vísa á, at her sanniliga er vítt til veggja. Alt ella tað mesta á hesum listanum er eisini natúrligur partur av nútímans bókasavnsfrøði og bókasavnsarbeiði.

Skulu vit trúgva nøkrum av teimum kanningum, sum hava verið gjørdar til tess at lýsa, hvussu skúlanæmingar ella lesandi brúka bókasavnið, so er tað ikki stórvegis, bókasavnið einsamalt kann gera við støðuna. Í kanningini *Studenten och biblioteket. En användarundersökning av fyra högskolebibliotek*, sum Magnus Petersson hevur staðið fyri, verður ávíst, at tað í høvuðsheitum eru viðurskifti uttan fyri bókasavnið, sum gera av, hvussu og hvussu nógv tey lesandi brúka bókasavnið. Í niðurstøðuni til kanningina sigur hann:

> ”Annorlunda uttryckt kan man säga att studenternas syn på informationssökning och biblioteksanvändning ytterst betingas av den kunskapssyn och tradition som ett visst ämnesfält uttrycker via utbildningarnas pedagogiska upplägg och lärarpåverkan".

---

[12] *Christine Bruce: Seven Faces of Information Literacy in Higher Education. - 1997. - Greinin kann lesast á: http://www2.fit.qut.edu.au/InfoSys/bruce/inflit/faces/faces1.htm*
[13] *Ibid.*

Og hann heldur fram:

> ”Det är med andra ord det pedagogiska upplägget av utbildningarna som behöver ändras för att studenterna skall känna att biblioteksanvändning och informationssökning är integrerade och nödvändiga delar av en utbildning. Det är också först då som det finns någon egentlig anledning för lärarna att stimulera sina studenter till att använda bibliotekets tjänster”.[14]

Hóast frálæra ella vanlig bókasavnskunning ikki einsamøll loysir trupulleikarnar, tí har skal eisini námsfrøðilig ráðlegging til, so kann tað vera skilagott at geva sær far um, hvat frálæra í kunningarførleika fevnir um. Tí nógv kundi bent á, at bókavørðurin í komandi tíðum fer at fáa ein týðandi leiklut, tá ið bókasavnskunning í breiðastu merking skiftir frá at vera kunning til veruliga frálæru.

Í 1994-frágreiðingini hjá Ocotillo[15] verður frálæra í kunningarførleika umrødd soleiðis:

> “Teaching information literacy involves communicating the power and scope of information as well as explaining how information is organized, how it is retrieved through a variety of access sources and tools, and how to evaluate, organize, and apply information to a variety of problems and situations”.

Tað sæst beinanvegin, at henda frálæra er ikki arbeiði, sum tú hevur framíhjá. Og tað er heldur ikki vist, at henda frálæra einans eigur at fara fram í bókasøvnunum, soleiðis sum tað eisini er nevnt omanfyri, hóast tað átti at verið har, serkunnleikin á hesum øki lá.

Bókasøvnini hava higartil ikki verið von at gera so nógv um seg. Tey hava verið til sum eitt tilboð, sum nógv hava tikið av við gleði, meðan onnur koma har meira sjáldan ella ongantíð. Okkurt kundi eisini bent á, at fleiri dámar at koma á bókasavnið, at sita og lesa í einum friðarligum umhvørvi, sum fremur lesihugin. Men so skulu eisini umstøður vera til tess. Og hesin parturin av bókasavnstænastuni, eins og aðrir týðandi partar, sum ikki eru umrøddir her, skulu sjálvandi varðveitast - eisini um bókasavnið skiftir frá at vera mentanartilboð til at vera læridepil.

IV

Hetta nýggja og tættari sambandið millum bókasøvn og frálæru, sum er umrøtt omanfyri, hevur eisini sett sín dám á føroyska kjakið um bókasavnsviðurskifti.

Í seinastu ársfrágreiðingini hjá Landsbókasavninum skrivar Mortan Hentze, stovnsbókavørður, áhugaverda grein um Stovnstænastuna[16]. Hann greiðir her frá, at alt fleiri stovnsbókasøvn og bókasøvn á hægri skúlum í seinastuni hava heitt á Stovnstænastuna um at "skipa og skráseta teirra bókastovnar til nýtilig nútímans bókasøvn".

Men Mortan Hentze hevur royndirnar og kann vísa á, at slíkt arbeiði er ikki løtuverk, tí at júst hesin parturin av bókasavnsarbeiðnum, at skipa og skráseta, er bæði orku- og tíðarkrevjandi. Harfyri nýtast stovnarnir sjálvandi ikki at halda seg aftur, tí Mortan Hentze mælir teimum framhaldandi til at lata teirra bókasavnstilfar telduskráseta í samstarvi við Stovnstænastuna. Hetta ljóðar sera skilagott, men tað, sum ger hesa greinina áhugaverda fyri tað evnið, sum her verður viðgjørt, er, at greinskrivarin spyr tann heldur naska spurningin, um tað er neyðugt at

---

[14] *Kanningin kann lesast á: http://www.kb.se/bibsam/bidrag/projbidr/rappobhs.htm.*
[15] *Ocotillo Report 94: Information Literacy: (http://www.mcli.dist.maricopa.edu/ocotillo/report94/rep7.html).*
[16] *Mortan Hentze: Stovnstænastan. "Halló - her valdar tað reina kaos ..."*

hava stovnsbókasøvn? Hann spyr í sama viðfangi, um ikki internetið kann væl alt tað, sum bókasøvnini áður høvdu sum sítt.

Svarið er, at so er ikki.

Tað er ein sannroynd, sum ofta verður gloymd, at *onkur* skal skipa informatiónina, skal hon vera atkomulig í nýtiligum formi. Í dag geva vit okkum heldur ikki so nógv far um, hvar informatiónin verður goymd. Og hesin *onkur* í greinini hjá Mortan Hentze er bókavørðurin. Her skulu vit helst hugsa meira um bókavarðastarvið enn um tann ávísa bókavørðin. Vit vita eisini, at internetið er á tremur av informatión, og at internetið eisini gevur øktar møguleikar fyri at heinta informatión.

Men á internetinum er nógv informatión, sum er óskipað, tí har er snøgt sagt ov lítið av tí, sum á enskum máli verður rópt 'knowledge management'. Men her er tað bókavørðurin trínur inn á pallin sum tann, ið stýrir og skipar stovnsins vitan, bæði vitan, sum er goymd í stovninum, og vitan, sum verður boðin út uttan fyri stovnin, t.d. gjøgnum Internetið. Bókasavnið er sostatt ikki bara bøkur og tíðarrit, men nýggir miðlar og nýggjar kunningar-rásir. Afturat hesum kemur, at í dag rokna vit við, at bókasøvnini eiga at stuðla førleika-menning og vera aðalkraftin í einum lærandi umhvørvi!

Í okkara grannalondum er meiri vanligt, sigur Mortan Hentze og trívur eftir eini ímynd úr læruni um anatomi, "at bókasøvnini gerast hjartað í stovninum". Og hann tekur afturíaftur, at

> "bókavørðurin er tann, sum syrgir fyri, at hjartapumpan slær optimalt, og at rætta informatiónin rennur gjøgnum tær røttu æðrarnar ta røttu løtuna".

Onkur vildi hildið, at nú var nóg mikið, men so upplýsir greinskrivarin, at aðrastaðni er ikki óvanligt, at bókavørðir hava skift heiti og eru farnir at pynta seg við ymiskum snjøllum nútímans titlum - sjálvur haldi eg, at heitið *kunningarfrøðingur* hóskar væl - í hvussu er til innihaldið í tí starvi, sum bókavørðurin fer at hava í framtíðini.

Men onki kemur úr ongum. Skulu bókasøvnini gerast "nýtilig nútímans bókasøvn", so noyð-ast tey at leggja eina bókasavnsætlan, eina strategi ella allýsing, sum sigur, hvat ætlanin við bókasavninum er. Og her skal vera pláss fyri bæði tí loftlætta og tí meira jarðbundna, ið skal til fyri at náa málinum.

Eg havi loyvt mær at endurgeva rættiliga neyvt ein samandrátt av einum parti av tí, sum stóð í greinini hjá Mortan Hentze, tí hetta kanska er fyrsta føroyska ítøkiliga dømið um, at bóka-vørðir vilja verða virdir fyri tað arbeiðið, sum teir gera, og at teir vilja hava eitt starv, sum veruliga ger mun. Og hví skal tað vera ein ynskidreymur at sleppa at vísa, at tú ikki bara veitst, men eisini dugir?

Ynskið um at nútímansgera bókasavnsskipanina, sum kom fram í greinini, ið varð umrødd omanfyri, kemur eisini týðiliga til sjóndar í álitinum *Bókasavnsviðurskiftini á vinnu- og miðnámsskúlunum*, sum ein arbeiðsbólkur gjørdi fyri Mentamálastýrið í 2000. Hetta álitið, sum fyrst og fremst snýr seg um fysisku karmarnar hjá bókasøvnunum, skráseting og teldutøkni, tekur støði í námsfrøðiligu gongdini tey seinastu árini, sum hevur ført við sær, at ein vaksandi partur av skúlaarbeiðnum eru verkætlanir og uppgávur, har næmingarnir í alt størri mun arbeiða sjálvstøðugt, stakir ella í smærri bólkum. Hetta hevur økt krøvini til bókasavnsskipanina.

Tað eigur at nevnast, at tá ið álitið var skrivað, var onki lógargrundarlag fyri skúlabókasøvnum á føroysku vinnu- og miðnámsskúlunum. Hetta er síðan broytt við nýggju bókasavnslógini, sum kom í gildi 1. januar 2002.

Í álitinum verður víst á, at fyri at nøkta nýggju krøvini, mugu bókasøvnini umskipast til veruligar lærideplar, har umstøður eru at arbeiða í bólkum, og har arbeiðspláss við teldu, internetsambandi og elektroniskum leitimøguleikum eru tøk hjá einstaklingum. Bókasavnið má fáa pláss á skúlunum, so at tað er lætt at koma at, og má skipast sum ein verulig kunningarmiðstøð.

Arbeiðsbólkurin, sum skrivar álitið, dugir at síggja, at tað skilabesta er, at allar eindirnar í bókasavnsskipanini samstarva. Væl vitandi, at fleiri ymiskir starvsbólkar og stovnar, sum higartil hava mett seg at vera alkønir hvør á sínum øki, skulu samstarva, skal nakað munagott spyrjast burturúr, letur arbeiðsbólkurin spurningin um, hvussu samstarvið skal skipast, vera ósvaraðan. Hetta kanska fyri ikki at ganga nøkrum ov nær. Men tann, sum lesur álitið, verður tó skjótt varugur við fleiri viðurskifti, sum kunnu føra til samstarv, um tikið verður eftir teimum tilmælum, sum arbeiðsbólkurin leggur fyri myndugleikarnar at taka støðu til.

Vit kunnu nevna, at mælt verður til, at bókasøvnini brúka somu telduskrásetingarskipan, sama skrásetingarhátt, og at ein skipan við fakbókasøvnum verður sett í verk. Harumframt kundi samstarvið millum bókavørðir og skúlabókavørðir, sum álitið umrøður, eisini fevnt um eitt nú útbúgving og eftirútbúgving. Eg nevni júst hesi viðurskiftini, tí at tey kunnu vera við til at bróta niður múrar millum starvsbólkar og arbeiðsøki.

Slík felags tiltøk, sum ganga um fakmørk, ella amboð, sum verða brúkt av fleiri ymiskum sínámillum ólíkum stovnum, og sum kunnu vera við til at samansjóða eina fjøltáttaða heild, hava í virkisskipanarlæruni fingið heitið 'boundary objects'. Tað kunnu vera góðar grundir til at brúka slík skipanarlig amboð, tá ið tað er neyðugt.

Tað finst ein hópur av lýsingum av fyribrigdinum 'boundary objects', so eg loyvi mær at velja eina lýsing burturúr, sum eftir mínum tykki tekur fram teir fyrimunir, sum kunnu koma av, at eitt samstarv at kalla óbeinleiðis kemur í lag. Í greinini *Organizing Knowledge,* sum John Seely Brown og Paul Duguis hava skrivað, finna vit hesa lýsing av 'boundary objects':

"Through [Boundary Objects], a community can come to understand what is common and what is distinct about another community, its practices, and its world view. Boundary objects not only help to clarify the attitudes of other communities, they can also make a community's own presuppositions apparent to itself [and encourage) reflection..."[17]

Júst hetta at skapa álit millum fakbólkar, samstundis sum tú viðurkennir serligu fakligu førleikarnar hjá hvørjum øðrum, og samstundis sum tú fært tikið tína egnu fatan upp til endurskoðan, má vera nakað, sum vit øll áttu at kunna tikið til okkum. Serliga um tað tænir eini góðari sak.

Í nevnda áliti er annars ein rættiliga umfatandi og áhugaverd lýsing av, hvat hugtakið bókasavnstænasta fevnir um. Henda lýsing er øll sum hon er endurgivin á síðu 36.

---

[17] *John Seely Brown og Paul Duguid: Organizing Knowledge. - Grein í: California Management Review, Vol. 40, No. 3.*

V

Eg byrjaði hesa grein við at siga, at tað liggur ikki til okkum føroyingar at vera heimspekingar. Hetta varð ikki sagt fyri at klikkja niður á mínar landsmenn, men eigur heldur at uppfatast sum ein staðfesting av, at vit eru eitt praktiskt fólk, sum ger tað, sum er neyðugt.

Tá ið á stendur, brúka vit av sosiala kapitalinum, sum onkur vildi vera við herfyri.

Vit fylgja væl við í øllum, sum hendir úti í heimi, og vilja meta okkum á hædd við okkara grannalond, sum vit plaga at taka til. Men viðhvørt tykir mær, at vit gera tað ikki til lítar. Tað er sum gerast vit lin í kongunum og hava hug at kasta frá okkum, tá ið tað verður óslætt í sjónum, og átrokandi uppgávur fara at tykjast torførar at loysa. Tað ber til at vóna, at tað gongur kortini, og at okkum ikki nýtist at gera tað nógva, men at gera sær *tað* til leiðreglu er ikki ráðiligt.

Vit í bókasavnsheiminum hava ofta hildið, at tað gongur heldur striltið at fáa sett tað í verk, sum myndugleikarnir hava sagt seg vilja fremja. Og neyvan er tað uttan grund. Kanska hevði tað gjørt mun, um vit av fullum huga tóku undir við tí, sum vit siga og skriva, og skiltu, at ofta liggur okkurt veruligt aftan fyri álit og útgreiningar, sum fólk seta sítt navn undir.

Okkurt, sum fólk halda hevur týdning. Ella enntá okkurt, sum hevur týdning ...

**Bókmentir:**

**Benedikte Ehlers og Gordon Pedersen**: Uddannelsesbibliotek informations- og læringscenter. En evaluering af erhvervsskolernes biblioteksprojekter. - Kbh., Undervisningsministeriet, 2000.

**Bókasavnsviðurskiftini** á vinnu- og miðnámsskúlunum. Álit skrivað av arbeiðsbólki settur av Undirvísingar- og mentamálastýrinum 13. apríl 2000. - Tórsh., 2000.

**Carol Collier Kuhlthau**: Seeking meaning. A process approach to library and information services. Norwood, Ablex Publishing Corporation, 1993.

**Hans Martin Fagerli**: En arena for læring og samarbeid. Om biblioteksfaglige og pedagogiske utfordringer i læringsmodellen. - Høgskolen i Oslo, 2000.

**Mortan Hentze**: Stovnstænastan. "Halló - her valdar tað reina kaos...." Føroya landsbókasavn: Ársfrágreiðing 2000. - Tórsh. 2001, s. 20-23.

**Råd** og vink om biblioteksfunktionen på gymnasier, hf-kurser og erhvervsskoler. - Kbh., Undervisningsministeriet, 1997.

**Bókasavnstænasta**

Í dag er bókasavnstænasta so nógv meira enn bara bøkur. Og skúlabókasavnstænasta ikki um at tala.

Her koma serliga inn í myndina nýggir undirvísingarhættir við nýggjum undirvísingaramboðum. Hetta hevur við sær, at heilt onnur krøv verða sett, ikki bara til tað innihaldsliga í einum skúlabókasavni, men eisini til teir fysisku karmarnar í einum nútímans skúlabókasavni, enn gjørt varð bara fyri nøkrum heilt fáum árum síðan.

Tá ið tosað verður um tíðarhóskandi bókasøvn í dag, verður ikki bara hugsað um atgeingi til bøkur og møguleikan at læna tær. Elektronisku leitimøguleikarnir gera, at tú sum lánari hevur nógv lættari og betri atgongd til skrásett tilfar - bæði úti og heima. Tú kanst leita í pørtum av bókum og tíðarritum, og í mongum førum kanst tú bíleggja tekstin beint av skíggjanum. Hesin møguleikin ger, at annað tilfar sum t.d. tíðarrit, fløgur, filmar, tónleikur og internetatgongd, er ein natúrligur partur av innihaldinum á bókasøvnunum. V.øo. skal eisini hugsast heilt øðrvísi um teir fysisku karmarnar, tí nú eru ikki bara hillar, borð og stólar at hugsa um. Hugsast má eisini um at útvega lánarunum/brúkarunum aðrar arbeiðsumstøður enn tær vanligu, so at teir fáa veruligt gagn av teimum tilboðum, bókasøvnini kunnu veita. Her verður serliga hugsað um: amboð, útgerð og starvsfólk, sum kunnu veita fakligan kunnleika um bókasavnstænastuna, og her verður hugsað um ta fysisku plaseringina av bókasavninum í umhvørvinum sum heild, og í skúlanum serstakliga.

Tíðin er vissuliga runnin frá tí hugburði, at bókasavnið kann liggja uppi í einum avlopsrúmi úti undir væðingini, niðri í kjallaranum ímillum kustar og spannir, ella saman við serundirvísingini inni í teirri gomlu skúlastovuni. Nú føroyska samfelagið, sum tað er at fegnast um, hevur sett sær fyri at veita vinnu- og miðnámsskúlunum eina líkinda bókasavnstænastu, mugu vit staðfesta, at vit mugu taka annað skinn um bak, skulu vit nøkta tann bókasavnstørv, hesar útbúgvingar krevja.



# Norðurlendska bókasavnsvikan

**Durita Joensen**

Síðani 1997 hevur eitt afturvendandi tiltak verið hildið á teimum norðurlendsku bókasøvnunum. Hetta er tann norðurlendska bókasavnsvikan - Í skýmingini - sum verður hildin eina viku í november mánaði.

Bókasavnsvikan er eitt samarbeiði millum norrønu feløgini, tey norðurlendsku bókasavnsfeløgini og PR-felagið fyri norðurlendsk bókasøvn. Endamálið við bókasavnsvikuni er at fremja áhugan fyri norðurlendskari mentan og bókmentum og at fremja tann norðurlendska samleikan.

Vikan er skipað soleiðis, at eitt høvuðsevni verður valt fyri alla vikuna. Umframt hetta verða tveir prosatekstir valdir út, sum lýsa ársins evni. Eitt árið var evnið Børn í Norðurlondum, tá var so sjálvsagt at velja eina av søgunum hjá Astrid Lindgren um Emil úr Lønnebergi.

Byrjað verður við einum dimmalættingarhaldi og einum Í skýmingini haldi. Dimmalættingarhaldið er fyri børn og verður hildið mánamorgun á skúla- og barnabókasøvnum runt øll Norðurlond. Hetta er eitt ógvuliga væl umtókt tiltak og fleiri túsund børn eru við á hvørjum ári.

Byrjanarhaldið fyri vaksin verður hildið samstundis í Norðurlondum, úr Grønlandi í norðri til Finnland í eystri. Øll elektrisk ljós verða sløkt, stearinljós verða tendrað, og í glæmuni av stearinljósunum verður ársins tekstur lisin upp.

Í 2001 savnaðu fleiri enn 1000 bókasøvn og skúlar runt um í Norðurlondum og Baltalondum ein stóran skara av áhoyrarum til tiltøk alla vikuna, og bókasavnsvikan er sostatt vorðin til tað størsta norðurlendska tiltakið við umleið 200.000 luttakarum.

Eisini her í Føroyum hava vit hildið norðurlendsku bókasavnsvikuna. Føroya landsbókasavn var við fyrstu ferð í 1998, tá evnið var skemt í Norðurlondum. Kvøldið var væleydnað við upplestri, fyrilestri og framsýning av skemtitekningum hjá Óla P.

Hetta sama ár helt Fuglafjarðar bókasavn eisini bókasavnsvikuna. Síðani er Klaksvíkar bókasavn komið við og hevur verið við tey seinastu árini.

Í 2001 komu nakrir føroyskir skúlar og skúlabókasøvn við, og út frá frágreiðingunum frá teimum kunnu vit staðfesta, at hugfloginum til at finna uppá áhugaverd tiltøk bilar einki.

2002 er hátíðarár innan norðurlendskt samarbeiði, bæði innan politikk og innan mentan. Norðurlandaráðið fyllir 50 ár og norðurlendska bókmentaheiðursløn Norðurlandaráðsins verður givin fyri 40. ferð. Hetta sæst eisini aftur í evninum fyri ársins bókasavnsviku, sum byrjar 4. november 2002.

Høvuðsevnið fyri vikuna er :

Norðurlond hava orðið. Norðurlandaráðið 50 ár

Hesi fimm árini, sum tiltakið hevur verið, eru vit komin víða um í teimum norðurlendsku bókmentunum. Og so er tað gleðiliga hent, at í ár er túrurin komin til okkara egnu bókmentir.

4. november 2002 skal stuttsøgan "De stumme gæster" úr bókini Laterna Magica hjá Williami Heinesen lesast upp, og heiðurin at gera plakat og postkort hevur ein føroyingur fingið. So sigast kann, at Føroyar verða í fokus í viku 45 á teimum norðurlendsku bókasøvnunum.

Umframt stuttsøguna hjá Williami Heinesen skal ein søga hjá finsku Tove Jansson, um tey vælkendu Mumitrøllini, lesast upp á dimmalættingarhaldinum mánamorgunin 4. november.

Meira kann lesast á heimasíðuni hjá norðurlendsku bókasavnsvikuni:

www.nordiskbiblioteksvecka.org.



# Setursbókasavnið

**Herluf Hansen**

Avtalan sum var gjørd millum Fróðskaparsetrið og Landsbókasavnið í 1994 hevur nú verið í gildi í nøkur ár. Sambært avtaluni skal Setrið gjalda fyri ein bókavørð, sum fakliga er knýttur at Landsbókasavninum. Bókavørðurin hevur fakligu røktina av Setursbókasavninum um hendi, hetta fevnir um m.a. vegleiðing, skráseting, bókakeyp. Skipað hevur verið soleiðis fyri at bókavørður hevur verið at hitta á deildarbókasøvnunum til fast ásettar tíðir.

Fróðskaparsetrið hevur tríggjar deildir, sum liggja hvør sær, somuleiðis eisini við deildar-bókasøvnunum. Føroyamáls-, Náttúruvísinda- og Søgu- og samfelagsdeildin hava hvør sítt bókasavn. Á deildarbókasøvnunum eru teldur, ið bókavørðurin nýtir. Setursbókasavnið virkar fyrst og fremst sum handbókasavn hjá lærarum, granskarum og næmingum á staðnum. Tískil verður tilfar ikki lænt til fólk uttanfyri stovnin. Samstarv er tó við Landsbókasavnið hesum viðvíkjandi, tá Setrið eigur tilfar t.d. tíðarrit, sum Landsbókasavnið ikki eigur.

Hóast bókasavnið er spjatt á trý støð, er alt telduskrásetta tilfarið at finna í einum og sama dátugrunni, Fróðskapargrunninum. Hesin dátugrunnur er á heimasíðu Landsbókasavnsins. So-statt ber til hjá almenninginum at leita í skrásetta bókastovninum hjá deildunum á Setrinum.

Á Føroyamálsdeildini eru allar bøkur komnar eftir 1991 skrásettar, meðan partur av savni eftir Chr. Matras og eldri tilfari er skrásettur. Eldri tilfar er skrásett á kort. Hetta deildarbókasavnið hevur lutfalsliga best pláss og finst har handbókasavn, lesistova og tíðarritasavn. Her skal alt bókatilfarið skrásetast umframt tíðarritini. Roynt hevur verið fyri lestrarbyrjan at kunna nýggjar næmingar um bókasavnið, um skipan og nýtslu. Hetta hevur roynst væl.

Næstum allar bøkurnar á Náttúruvísindadeildini eru skrásettar. Bøkur á skrivstovunum eru skrásettar seinasta árið. Her verður dentur lagdur á at skráseta nýggjastu bøkurnar so hvørt. Á bókasavninum er eisini eitt arbeiðspláss til lesandi.

Alt bókatilfarið á Søgu- og samfelagsdeildini er skrásett. Her verður skrásett so hvørt nýggjar bøkur verða fingnar til vega. Her er ætlanin at seta grindlar á bøkurnar í næstum. Soleiðis kann ein útlánsskipan fyri deildina møguliga fáast at virka, um gjørligt við sjálvavgreiðslu.

Bókasøvnini á Setrinum verða væl vitjað av lærarum og næmingum. Tey verða ikki nýtt heilt sum áður við tað at bøkur kunnu finnast við telduni, tí er leitingin eftir bókum ikki longur so staðbundin. Tí kann verða leitað meira miðvíst á sjálvum bókasavninum skjótari enn áður.

At grindlar verða settir á bøkur, hevur við sær, at bókasavnið gerst meira brúkaravinarligt, samstundis sum hetta fremur gjøgnumskygni og hartil lættir um arbeiðið og nýtsluna. Tá kann altíð staðfestast á telduskíggjanum, hvar bókin er.

# Hava talmerkt bøkur í góð 5 ár (ISBN)

**Erhard Jacobsen**

ISBN (International Standard Book Number) er ein alment viðurkend altjóða talmerking av bókum. Skipanin varð sett í verk í 1968. Føroyska ISBN-skipanin, sum Landsbókasavnið umsitur, fór at virka 1. januar 1995.

Tey 30 árini, sum skipanin hevur verið virkin, hevur hon havt alstóran týdning fyri altjóða bókamarknaðin. Við ISBN ber til at finna og eyðmerkja ein og hvønn bókatittul, uttan mun til, hvar hann er útkomin. ISBN kann eisini gerast maskinlesbart (EAN). 159 lond ella landspartar eru nú skrásettir limir í ISBN-skipanini.

ISBN er eitt 10-siffrað tal, sum er sett saman av fýra pørtum:

landatali, forlagsnummari, tittultali og gátali.

Føroyar hava landatalið 99918.

Sum dømi kunnu vit nevna, at **Árbók fyri Føroyar 2000**, sum Hagstova Føroya og Føroya skúlabókagrunnur geva út í felag, hevur ISBN 99918-0-240-1. Av talinum kunnu vit lesa, at hetta er bók, sum er givin út í Føroyum (99918), 0 er forlagsnummarið hjá Føroya skúlabókagrunni (sum er tað av forløgunum, ið stendur fyri avgreiðslu og sølu av teirri prentaðu bókini), 240 er tittultalið fyri júst hesa útgávuna, meðan 1 er gátalið (Check Digit).

### Umsitingin av ISBN-skipanini

Umsitingin av ISBN-skipanini er býtt í trý.

1) **Altjóða ISBN-skrivstovan** í Berlin hevur yvirumsjón við ISBN-skipanini.

2) **Bólkaskrivstovan** (í Føroyum er tað Landsbókasavnið) hevur umsjón við ISBN-skipanini á staðnum.

   Høvuðsarbeiðið hjá Bólkaskrivstovuni er:

   - **at** tilluta teimum forløgum og útgevarum, sum søkja um tað, forlagsnummar,
   - **at** lata forløgunum og útgevarunum tittulnummur,
   - **at** skráseta og almannakunngera ISBN, sum forløgini og útgevarar talmerkja teirra bøkur við, og
   - **at** veita forløgum og útgevarum ráð og vegleiðing um, hvussu ISBN-skipanin virkar og eigur at verða umsitin.

Triði parturin í ISBN-skipanini er

3) **forløgini** og **útgevarar**.

Tað er vert at minna á, at tað eru forløgini og aðrir útgevarar, sum sjálv talmerkja sínar útgávur við ISBN.

Føroyska ISBN-skipanin hevur verið til síðan 1995 ella í góð 5 ár. Sum heild hevur tað eydnast væl at fáa skipanina at virka, hóast umsitingin av skipanini er býtt út á nógvar hendur. Landsbókasavnið roynir tó javnan at minna forløgini á at vera umhyggin, tá ið tey tilluta sínum útgávum ISBN. Tað eigur at nevnast, at sama ISBN bara kann brúkast eina ferð. Og forløgini og útgevarar eiga at rættlesa ISBN á nýggjum útgávum at tryggja sær, at tey eru rætt skrivað.

Um árskiftið 2001 vóru 90 forløg ella útgevarar skrásett í føroysku ISBN-skipanini.

**3** forløg hava 1-siffrað forlagsnummar, og tey hava tískil 1.000 ISBN (tittulnummur) at talmerkja sínar bøkur við.
**20** forløg hava 2-siffrað forlagsnummar, og hava tey tískil 100 ISBN (tittulnummur) at talmerkja sínar bøkur við.
**67** forløg hava 3-siffrað forlagsnummar, og hesi hava tískil 10 ISBN (tittulnummur) at talmerkja sínar bøkur við.

Nøkur forløg hava brúkt síni tøl (tittulnummur), men hava síðan fingið nýggj.

Tey gott og væl fimm árini, síðan føroyska ISBN-skipanin varð sett í verk, eru umleið 1000 føroyskir titlar skrásettir við ISBN.

Upplýsast kann, at á altjóða støði er arbeiði sett í verk, sum miðjar ímóti at broyta verandi ISBN-skipan. Ætlanin er m.a. at økja um møguleikarnar fyri framhaldandi talmerking av bókum, og eisini skal støða takast til, um skipanin møguliga skal fevna um eitt nú talgildar (digitalar) útgávur, tvs. bøkur og rit, sum bara eru til sum elektronisk rit. Hetta arbeiðið verður væntandi liðugt í 2005.

So tey komandi árini verður verandi ISBN-skipan, sum er grundað á ISO-tilmæli 2108 frá 1992, tó framvegis í gildi.

## Nýggj bókasavnslóg

Í nýggju bókasavnslógini, sum kemur í gildi 1. januar 2002, stendur í § 3, stk. 5, at eitt av endamálunum hjá Landsbókasavninum er: "at vera føroysk ISBN, ISMN og ISSN-skrivstova í sambandi við altjóða skráseting av bókum, tónleiki og tíðarritum".

Landsbókasavnið arbeiðir í hesum sambandi við at fáa sett í verk ella átaka sær umsitingina av talmerking av øðrum skrivaðum tilfari og miðlum.

Nevnast kann **ISSN skipanin** (International Standard Serial Number), ið er talmerking av tíðarritum og bókarøðum. ISSN-skipanin verður í løtuni umsitin av Føroya landsbókasavni í samstarvi við Kongaliga Bókasavnið í Keypmannahavn.

Aðrar skipanir eru t.d. **ISMN** (International Standard Music Number), sum er ætlað til skráseting av tónleikaverkum, sum verða givin út á nótum, og **ISRC** (International Standard Recording Code), sum er ein altjóða skráseting av ljóð- og tónleikaupptøkum.

*Røðan, Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður í mentamálum, helt í Løgtinginum, tá ið uppskot til nýggja bókasavnslóg varð lagt fram í mars 2001*

# Uppskot um løgtingslóg um bókasøvn

Síðan løgtingslóg nr. 56 um megin-, fólka- og skúlabókasøvn varð samtykt á Føroya løgtingi 9/6-1988, hevur tað verið eitt stórt ynski frá føroysku bókasavnsmyndugleikunum, at lógin um Føroya landsbókasavn frá 1952 varð dagførd. Tá ið 1988-lógin nú hevur verið galdandi í skjótt 13 ár, og ikki enn er farin at virka eftir ætlan, varð mett, at tað var rættast, at henda lógin eisini varð tikin til viðgerðar av nýggjum og bøtt um. Ásetingarnar í hesum lógum hava nógv við hvørja aðra at gera, og tað ber illa til at endurskoða á einum øki, og so lata hitt økið bara liggja. Samfelag okkara er soleiðis háttað, at høgra hond má vita av, hvat vinstra hondin ger. Hetta hevur í høvuðsheitum verið útgangsstøðið í arbeiðinum við at gera hjálagda uppskot til løgtingslóg um bókasøvn.

Størsta broytingin við sjálvum lógartekstinum er tann, at nú verður talan um eina bókasavnslóg. Alt, sum hevur við føroyskt bókasavnsvirksemi, tað veri seg fólkabókasøvn, meginbókasøvn, skúlabókasøvn og Landsbókasavnið, at gera, er savnað saman í eina løgfrøðiliga eind. Hetta verður gjørt fyri at økið kann vera lættari at umsita bæði fyrisitingarliga og fíggjarliga.

### Avhendingarskyldan

Lógin um Landsbókasavnið frá 1952 og kunngerðin um avhendingar-skyldu, eisini frá 1952, eru báðar ótíðarhóskandi og svara ikki til nútíðar krøv. Í uppskotinum er m.a. hædd tikin fyri tøkniligu broytingini á framleiðsluøkinum, og roynt verður eisini at taka hædd fyri framtíðini, í tann mun hetta letur seg gera. Haraftrat vísir galdandi kunngerð um avhending av skyldueintøkum frá 1952 til eina danska lóg frá 1927, (Lov nr. 160 af 1. juli 1927 om pligtig Aflevering af Tryksager til offentlige Biblioteker). Lógin varð 1. januar 1998 sett úr gildi í Danmark. So tað er eyðsæð, at á hesum øki eru ábøtur neyðugar skjótast gjørligt. Áður var tað skyldan hjá prentsmiðjum at avhenda skyldueintøk til Landsbókasavnið. Eftir hesum uppskoti er tað skyldan hjá *framleiðarunum* at avhenda tað tey framleiða. V.øo. verður talan um nógv annað tilfar enn bara prentlutir. Kunngerðin um avhendingarskyldu frá 1952 er bygd inn í hetta lógaruppskotið, samstundis sum hon er víðkað og dagførd (sí kap. VIII). Í hesum døgum tá ið internet, KT og nýggir formar fyri samskiftis- og prentmøguleikum koma undan kavi, er tað sera umráðandi, at Føroyar fáa sína egnu lóggávu um avhendingarskyldu, tí tað hevur stóran mentanarligan og søguligan týdning fyri mentanarlívið og granskingina, at skipað verður fyri, at tað, ið gjørt verður á hesum øki, verður varðveitt, skrásett og gjørt atkomiligt hjá núverandi og komandi ættarliðum at granska. í.

Áður hevur tað verið so, at umframt Føroya landsbókasavn hava Kongaliga bókasavnið í Keypmannahavn og Statsbókasavnið í Århus eisini verið skyldubókasøvn fyri føroyskt prentað tilfar. Hetta er nú, frá danskari síðu, broytt soleiðis, at tað ikki er lógarkrav longur, at føroysk prentskylda skal sendast til Danmarkar. Í uppskotinum verður hædd tikin fyri hesum, og skotið verður upp, at sett verður á stovn í Føroyum eitt skyldubókasavn aftrat Landsbókasavninum. Eftir uppskotinum skal henda uppgávan leggjast til Klaksvíkar bókasavn.

### Megin-, fólka- og skúlabókasøvnini

Kapitlarnir um megin-, fólka- og skúlabókasøvn eru stórt sæð dagføringar av 1988-lógini, tó verður nú skotið upp, at landið kann verða skipað í 7 meginbókasavnsdømi, og at tað er landsstýrismaðurin í mentamálum, ið tilnevnir meginbókasøvnini. Enn eru tað ikki allar

kommunur og heldur ikki allir skúlar, ið hava skipað bókasavnsviðurskifti. Skulu vit klára at liva upp til hesa lógina, mugu kommunurnar taka sær um reiggj og stovna bókasøvnini, og landskassin má gjalda tað, sum lógin ásetir. Hetta hevur higartil verið ein trupulleiki, tí játtanin frá løgtingsins síðu til størri rakstur á bókasavnsøkinum hevur ikki verið í tráð við ynskini frá kommunum og skúlum.

### Rakstrarstudningurin

Rakstrarútreiðslubýtið ímillum land og kommunu er óbroytt 60 og 40%. Men tann broyting er skotin upp, at nú verður landskassastudningurin (60%) goldin "sambært góðkendari fíggjarætlan" og verður "útgoldin við fíggjarársbyrjan, og avroknað verður við fíggjarárslok". Hetta verður gjørt, fyri at tað skal vera lættari hjá bókasøvnunum at umsita tann pening, teimum verður tillutaður. Sambært galdandi lóg verður rakstrarstudningurin útgoldin, tá ið góðkendur roknskapur fyriliggur.

### Skúlabókasøvn í vinnu- og miðnámsskúlunum og í hægri undirvísingarstovnum

Heilt nýtt í uppskotinum er greinin um skúlabókasøvn í vinnu- og miðnámsskúlum og í hægri undirvísingarstovnum (§ 20). Stórur saknur hevur í nógv ár verið í skipaðum viðurskiftum á bókasavnsøkinum á nógvum av hesum skúlum og stovnum. Sum grundarlag undir hesi lógargrein hevur m.a. verið havt í huga álitið um skúlabókasøvnini á vinnu- og miðnáms-skúlunum, sum serligur arbeiðsbólkur, settur av Mentamálastýrinum, læt úr hondum í september 2000.

### Bókastovan

Grein 11 í 1988-lógini umrøðir ein sjálvstøðugan stovn, Bókastovuna, ið eftir lógini eigur at verða skipaður at røkja ymiskar bókasavnsuppgávur - bæði fyrisitingarligar og praktiskar. Hesin stovnur er ongantíð settur á stovn, men álagt hevur verið Landsbókasavninum at røkja tær mest átrokandi uppgávurnar hjá hesum stovni, meðan aðrar uppgávur hava ligið og bíðað. Nú verður skotið upp (§ 21-22), at Bókastovan verður løgd sum ein deild í Landsbóka-savninum.

Ein av uppgávunum hjá Bókastovuni er eisini at skipa fyri árliga býtinum av bókasavns-gjaldinum, sum verður játtað á løgtingsfíggjarlógini. Í 1988- lógini var henda upphæddin ásett til 8% av samlaðu játtanini til bókasavnsverkið. Nú verður skotið upp, at játtanin fyri 2001 verður kr. 1.442.000, ið svarar til 10% av játtanini til bókasavnsverkið og til Landsmiðstøðina fyri undirvísingartilboð árið 2001.

### Gransking

Landsbókasavnið hevur í nógv ár havt samstarv við Fróðskaparsetrið um bókasavnstænastu. Síðan 1995 hevur haraftrat verið skipað ein sokallað stovnstænasta, t.e. at stovnar og skúlar hava kunnað bílagt bókavarðatænastu frá Landsbókasavninum. Hetta hevur ført við sær, at fleiri og fleiri almennir stovnar og hægri skúlar hava fingið síni bókasøvn skrásett, soleiðis at tey eru lættari atkomilig og brúkilig hjá teimum, ið brúka tey skulu. Øll henda skrásetingin verður miðsavnað og stjórnað av Landsbókasavninum. - Sigast kann, at í hesum arbeiði liggur spírin til eitt týdningarmikið tilboð hjá teimum, ið ætla sær at granska í Føroyum, og ikki um at tala hjá teimum, ið ætla sær at granska í føroyskum viðurskiftum. Tað er tí av stórum týdningi hjá almennu umsitingini at gera vart við, at øll tann ørgrynna av bókligum tilfari, ið er til taks á almennum stovnum og skúlum er ogn Føroya fólks, og ikki ogn hjá nøkrum einstøkum starvsfólkum ella stovnum.

**Kostnaður**

Í uppskotinum verður nevnt, at broytingarnar í bókasavnslógini fara at krevja eina meirjáttan upp á 7 millónir kr. Hugsa vit um, hvussu langt ein góð bókasavnstænasta kann røkka, er hetta ikki tann stóra upphæddin, og hugsa vit um, hvussu nógv, ið tað almenna fær afturfyri, hevur hetta lítið og einki upp á seg. Til hetta er at siga, at samlaða játtanin til føroysku bókasøvnini í dag eru upp á kr. 11.900.000. Í 1989 var játtanin uml. 15 milliónir.

Hava vit í landinum væl útgjørd bókasøvn, fer hetta eftir stuttari tíð at geva landinum nógv aftur. - Íløga í góða bókasavnstænastu er íløga í fólkið!

# Bókasøvn

| | | |
|---|---|---|
| **Bókasavnið í Nes kommunu** | mánadag | kl. 16.00-18.00 |
| 650 Toftum | mikudag | kl. 19.00-21.00 |
| Tlf. 448872 | | |
| Solveig Debess | | |
| **Býarbókasavnið** | mánadag-fríggjadag | kl. 10.00-18.00 |
| Box 358 | leygardag | kl. 10.00-14.00 |
| 110 Tórshavn | | |
| Tlf. 313626/Fax 310371 | | |
| www.byarbok.fo | | |
| Anna Brimnes | | |
| **Fuglafjarðar bókasavn** | mánadag-fríggjadag | kl. 09.00-12.00 |
| 530 Fuglafirði | | kl. 13.00-17.00 |
| Tlf. 444745 | leygardag | kl. 9.00-12.00 |
| Petur Martin Petersen | | |
| **Glyvra bókasavn** | mánadag | kl. 19.00-20.00 |
| 625 Glyvrum | hósdag | kl. 19.00-21.00 |
| Tlf. 447331 | | |
| Hans Poulsen | | |
| **Hvalvíkar bókasavn** | mánadag og mikudag | kl. 19.00-20.30 |
| 430 Hvalvík | | |
| Tlf. 422028 | | |
| Jórun Egholm | | |
| **Klaksvíkar bókasavn** | mánadag-fríggjadag | kl. 13.00-18.00 |
| Box 45 | leygardag | kl. 10.00-13.00 |
| 700 Klaksvík | | |
| Tlf. 455757/Fax 455747 | | |
| Annika Egholm | | |
| **Kollafjarðar bókasavn** | | |
| 410 Kollafirði | | |
| Tlf. 421091 | | |
| Terje Hammer/Karin Hammer | | |
| **Leirvíkar bókasavn** | mánadag og hósdag | kl. 19.00-20.00 |
| 520 Leirvík | | |
| Tlf. 443202 | | |
| Edvin Joensen | | |
| **Sandavágs-Miðvágs bókasavn** | mánadag | kl. 19.00-20.30 |
| 360 Sandavági | hósdag | kl. 17.00-18.30 |
| Tlf. 332512/332507 | | |
| Oddmar Ravnsfjall/Heini F. Petersen/Jákup Jacobsen | | |
| **Stranda bókasavn** | mánadag | kl. 18.00-20.00 |
| 490 Strondum | hósdag | kl. 19.00-21.00 |
| Tlf. 448707 | | |
| Ólavur Christiansen | | |

| | | |
|---|---|---|
| **Sunda bókasavn** | | |
| 400 Oyrarbakka | | |
| Tlf. 422245 | | |
| Súsanna Hammer | | |
| **Sørvágs bókasavn** | mikudag | kl. 18.30-20.00 |
| 380 Sørvági | | |
| Hildigunn Niclasen | | |
| **Tvøroyrar bókasavn** | týsdag og hósdag | kl. 17.00-20.00 |
| 800 Tvøroyri | | |
| Tlf. 371584 | | |
| Martin S. Eidesgaard | | |
| **Vágs bókasavn** | mánadag | kl. 18.00-20.00 |
| 900 Vági | týsdag, mikudag og | |
| Tlf. 373991 | hósdag | kl. 15.00-18.00 |
| Henrikka Joensen/Óli Holm | | |
| **Vestmanna bókasavn** | mánadag og hósdag | kl. 19.00-21.00 |
| 350 Vestmanna | | |
| Tlf. 424551 | | |
| Niels Brimnes/Gyðja Hjalmarsdóttir | | |
| **Føroya Landsbókasavn** | mánadag-mikudag | kl. 10.00-20.00 |
| Box 61 | hósdag-fríggjadag | kl. 10.00-17.00 |
| J.C. Svabos gøtu 16 | | |
| 110 Tórshavn | | |
| Tlf. 311626/Fax 318895 | | |
| www.flb.fo | | |

**Hvalbiar skúlabókasavn**
850 Hvalba
Tlf. 375083
Jákup Jensen

**Skúlabókasavnið**
Kvívíkar skúli
340 Kvívík
Tlf. 421291
Bjarni Heinesen

**Skúlabókasavnið**
Felagsskúlin á Oyrarbakka
400 Oyrarbakka
Tlf. 422084/422584/Fax 422156
Sólrún Rasmussen

**Bókasavnið**
Meginskúlin á Sandi
210 Sandi
Tlf. 361038
Eli Hentze

**Skúlabókasavn Argja skúla**
Box 2002
165 Argjum
Tlf. 314136
Regin av Steinum

**Skúlabókasavnið**
Eysturskúlin
Skúlagøtu
100 Tórshavn
Tlf. 314752
Katrin Rubeksen/Jóhanna Skýlindal

**Skúlabókasavnið**
Hoyvíkar skúli
Vegnum Langa
188 Hoyvík
Tlf. 315073
Hervør Jákupsson

**Skúlabókasavnið**
Kaldbaks skúli
180 Kaldbak
Tlf. 317845
Henning Tausen

**Skúlabókasavnið**
Kommunuskúlin
Tróndargøtu
100 Tórshavn
Tlf. 311947
Hansina Huusgaard

**Skúlabókasavnið**
Sankta Frans skúli
Varðagøtu 10
100 Tórshavn
Tlf. 312147
Poulina Slættanes

**Skúlabókasavnið**
Venjingarskúlin
Frælsinum 20
100 Tórshavn
Tlf. 313502
Anny M. Hansen

# Talvur

TALVA 1

**<u>Føroysk bókaútgáva 2001</u>**

| | **Fagurbókmentir** | | | | **Yrkisbókmentir** | | | **Skúla- og lærubøkur** | | | **Barna- og ungdóms bøkur** | | | **Tilsamans** | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | óbundið mál | bundið mál | síður | kr. | bøkur | síður | kr. | bøkur | síður | kr. | bøkur | síður | kr. | bøkur | síður | kr. |
| **Upprunaverk** | | | | | | | | | | | | | | | | |
| **Prentað í Føroyum** | 5 | 4 | 929 | 3.230 | 24 | 3.696 | 3.572 | 5 | 420 | 479 | 6 | 286 | 410 | 44 | 5.331 | 7.691 |
| **Prentað uttanlands** | 1 | | 417 | 250 | 17 | 3.172 | 3.876 | 6 | 643 | 726 | 1 | 60 | 95 | 25 | 4.292 | 4.947 |
| | | | | | | | | | | | | | | | | |
| **Týðingar** | | | | | | | | | | | | | | | | |
| **Prentaðar í Føroyum** | 6 | 1 | 1.761 | 1.390 | 3 | 544 | 350 | | | | 10 | 2.286 | 1.386 | 20 | 4.591 | 3.126 |
| **Prentaðar uttanlands** | | | | | 4 | 398 | 390 | | | | 24 | 1.183 | 1.929 | 28 | 1.581 | 2.319 |
| | | | | | | | | | | | | | | | | |
| **Bøkur tils. 2001** | **12** | **5** | | | **48** | | | **11** | | | **41** | | | **117** | | |
| **Síður tils. 2001** | | | **3.107** | | | **7.810** | | | **1.063** | | | **3.815** | | | **15.795** | |
| **Krónur tils. 2001** | | | | **4.870** | | | **8.188** | | | **1.205** | | | **3.820** | | | **18.083** |
| | | | | | | | | | | | | | | | | |
| **Bøkur tils. 2000** | 23 | 11 | | | 75 | | | 24 | | | 37 | | | 170 | | |
| **Bøkur tils. 1999** | 8 | 8 | | | 68 | | | 11 | | | 26 | | | 121 | | |
| **Bøkur tils. 1998** | 11 | 7 | | | 57 | | | 28 | | | 54 | | | 157 | | |

TALVA 2

**Føroysk bókaútgáva 2001** - býtt eftir máli

| | **Fagurbókmentir** | | **Yrkis- bókmentir** | **Skúla- og lærubøkur** | **Barna- bøkur** | **Tilsamans** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | óbundið mál | bundið mál | | | | |
| **Týðingar til føroyskt** | | | | | | |
| **úr amerikonskum** | 1 | | | | | 1 |
| **úr donskum** | 1 | | 1 | | 1 | 3 |
| **úr enskum** | 1 | | 4 | | 15 | 20 |
| **úr íslendskum** | | | | | 1 | 1 |
| **úr norskum** | 3 | | | | 4 | 7 |
| **úr svenskum** | | | | | 12 | 12 |
| **úr týskum** | | | 1 | | 1 | 2 |
| **úr øðrum málum** | | 1 | 1 | | | 2 |
| | | | | | | |
| **Týðingar tilsamans** | **6** | **1** | **7** | **0** | **34** | **48** |
| **Upphavsverk á føroyskum** | **6** | **4** | **41** | **11** | **7** | **69** |
| **Tilsamans** | **12** | **5** | **48** | **11** | **41** | **117** |

TALVA 3

**Føroysk bókaútgáva 1982-2001**[4]

| **Ár** | **Fagurbókmentir** | | | | **Yrkisbókmentir** | | **Skúla- og lærubøkur** | | **Barnabøkur** | | **Bøkur tilsamans** | | **Síður** | **Krónur** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | óbundið mál | | bundið mál | | | | | | | | | | | |
| **1982** | 11 | *5* | 8 | *2* | 30 | *5* | 25 | *7* | 18 | *13* | 92 | *32* | 8650 | 5450 |
| **1983** | 7 | *4* | 10 | *2* | 42 | *13* | 13 | *2* | 26 | *14* | 98 | *35* | 11732 | 6044 |
| **1984** | 10 | *6* | 8 | | 49 | *13* | 10 | *2* | 18 | *12* | 95 | *33* | 11503 | 6990 |
| **1985** | 10 | *3* | 9 | | 47 | *9* | 7 | | 26 | *21* | 99 | *33* | 11563 | 8626 |
| **1986** | 11 | *6* | 11 | *2* | 39 | *8* | 9 | *2* | 43 | *37* | 113 | *55* | 10686 | 9057 |
| **1987** | 6 | | 9 | | 35 | *8* | 13 | *4* | 46 | *37* | 109 | *49* | 9946 | 11206 |
| **1988** | 12 | *4* | 11 | | 32 | *6* | 18 | *8* | 58 | *53* | 131 | *71* | 16125 | 16863 |
| **1989** | 5 | *2* | 2 | | 44 | *6* | 23 | *11* | 74 | *67* | 148 | *86* | 16159 | 17617 |
| **1990** | 11 | *4* | 7 | *1* | 48 | *7* | 31 | *7* | 64 | *53* | 161 | *72* | 18674 | 19656 |
| **1991** | 12 | *7* | 3 | | 32 | *8* | 7 | *5* | 65 | *50* | 119 | *70* | 13879 | 13395 |
| **1992** | 7 | *3* | 5 | *2* | 39 | *11* | 23 | *8* | 43 | *33* | 117 | *57* | 13701 | 13571 |
| **1993** | 7 | *2* | 4 | *1* | 34 | *8* | 23 | *6* | 36 | *30* | 104 | *47* | 11932 | 9621 |
| **1994** | 8 | *3* | 7 | *1* | 39 | *9* | 35 | *18* | 40 | *36* | 129 | *67* | 15040 | 12315 |
| **1995** | 9 | *3* | 3 | | 62 | *9* | 28 | *12* | 53 | *50* | 155 | *74* | 20669 | 17316 |
| **1996** | 13 | *6* | 3 | *1* | 51 | *9* | 23 | *5* | 50 | *43* | 140 | *64* | 19401 | 16539 |
| **1997** | 10 | *4* | 5 | *1* | 47 | *9* | 22 | | 45 | *40* | 129 | *54* | 17182 | 14392 |
| **1998** | 11 | *6* | 7 | *1* | 57 | *5* | 28 | *4* | 54 | *45* | 157 | *61* | 28452 | 19850 |
| **1999** | 8 | *2* | 8 | *1* | 68 | *11* | 11 | *2* | 26 | *21* | 121 | *37* | 20587 | 15907 |
| **2000** | 23 | *16* | 11 | *1* | 75 | *13* | 24 | *2* | 37 | *34* | 170 | *66* | 29808 | 24756 |
| **2001** | 12 | *6* | 5 | *1* | 48 | *7* | 11 | | 41 | *34* | 117 | *48* | 15795 | 18083 |
| **1982-2001** | **203** | *92* | **136** | *17* | **918** | *174* | **384** | *105* | **863** | *723* | **2504** | *1063* | | |

[4] *tølini við skákskrift eru týðingar*

TALVA 4

**Føroysk bókaútgáva 1822-2001**

| Tíðarskeið | Útkomnar á føroyskum | Titlar í meðal um árið | Fólkatalið í tíðarskeiðnum |
|---|---|---|---|
| | | | |
| **1822-1899 (78 ár)** | 22 bøkur | 0,28 | 6.200-15.000 |
| **1900-1939 (40 ár)** | 197 bøkur | 4,90 | 15.000-28.000 |
| **1940-1949 (10 ár)** | 124 bøkur | 12,40 | 28.000-31.800 |
| **1950-1959 (10 ár)** | 173 bøkur | 17,30 | 31.800-34.600 |
| **1960-1969 (10 ár)** | 274 bøkur | 27,40 | 34.600-38.600 |
| **1970-1979 (10 ár)** | 686 bøkur | 66,80 | 38.600-43.200 |
| **1980-1989 (10 ár)** | 1.074 bøkur | 107,00 | 43.200-47.834 |
| **1990-1999 (10 ár)** | 1.332 bøkur | 133,20 | 47.834-45.404 |
| **2000-2001 (2 ár)** | 287 bøkur | 143,50 | 45.404-46.999 |
| **1822-2001 (180 ár)** | **4.169 bøkur** | | |

TALVA 5

**Virksemið hjá skúlabókasøvnunum 2000**

| Skúli | Bind | Vøkstur (bd.) | Útlán | Lánarar | Útreiðslur bókakonto | Samlaðar útreiðslur |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | |
| **Hvalbiar skúli** | 4.125 | 73 | 2.010 | 120 | 21.761 | 45.665 |
| **Felagsskúlin á Oyrarbakka** | 10.058 | 274 | 836 | | 70.512 | 70.512 |
| **Meginskúlin á Sandi** | 7.485 | 211 | 444 | 103 | 39.319 | 47.323 |
| **Tórshavn** | | | | | | |
| **Argja skúli** | | 325 | 11.007 | | | |
| **Eysturskúlin** | | 415 | 18.354 | | | |
| **Hoyvíkar skúli** | | 306 | 6.945 | | | |
| **Kommunuskúlin** | | 389 | 13.992 | | | |
| **Skt. Frans skúli** | | 206 | 9.417 | | | |
| **Venjingarskúlin** | | 443 | 11.858 | | | |
| **Kaldbaks skúli** | | 125 | | | | |

TALVA 6

**Virksemið hjá fólkabókasøvnunum 2000**

| Heimstaður | Fólkatal | Bind | Vøkstur (bd.) | Útlán | Lánarar | Útreiðslur bókakonto | Samlaðar útreiðslur |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | | |
| **Fuglafjørður** | 1.547 | 14.820 | 269 | 2.104 | 828 | 65.921 | 406.099 |
| **Giljanes** | 1.649 | 9.094 | 342 | 2.950 | 210 | 64.197 | 172.487 |
| **Glyvrar** | 2.475 | 12.256 | 225 | 7.430 | 530 | 53.951 | 72.643 |
| **Hvalvík** | 352 | 4.299 | 338 | 568 | 380 | 64.516 | 105.182 |
| **Klaksvík** | 4.779 | 26.236 | 454 | 25.233 | 2.534 | 307.639 | 1.428.507 |
| **Kollafjørður** | 956 | 10.679 | 383 | 752 | 192 | 54.408 | 100.341 |
| **Leirvík** | 821 | 6.548 | 236 | | 115 | 31.944 | 112.665 |
| **Oyrarbakki** | 455 | 4.500 | 179 | 1.314 | 105 | 33.260 | 54.702 |
| **Strendur** | 1.024 | 13.214 | 396 | | 390 | 86.796 | 155.149 |
| **Sørvágur** | 908 | 10.050 | | 698 | 180 | 85.488 | 152.991 |
| **Toftir** | 1.166 | 8.668 | 507 | 5.198 | 300 | 79.917 | 116.182 |
| **Tórshavn** | 16.786 | 50.925 | - 154 | 65.036 | 14.430 | 1.387.937[5] | 5.567.505 |
| **Tvøroyri** | 1.827 | 11.415 | 314 | 1.386 | 687 | 46.521 | 103.487 |
| **Vágur** | 1.375 | 15.610 | 536 | 3.676 | 754 | 130.340 | 438.752 |
| **Vestmanna** | 1.236 | 13.716 | 276 | 6.604 | 150 | 96.985 | 212.348 |
| | | | | | | | |
| **Tilsamans** | **37.356** | **212.030** | **4.301** | **122.949** | **21.785** | **2.589.820** | **9.199.040** |

[5] *íroknað bókakeyp til 7 skúlabókasøvn*


Bókasavnslógin
2/5 - 2001